TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Fíggjarætlan

# 2006



**Lýsing av virkisøkjum, málum og avrikum**

November 2005



## Fororð

Eitt av aðalmálunum hjá nýggju samgonguni er at styrkja og menna stýringina av kommununi, og her verður gjøgnumskygni raðfest frammarlaga. Í fíggjarætlanini síggjast politisku stevnumiðini hjá býráðnum og mál, sum skulu fremjast í 2006. Hetta kemur til sjóndar í peningaligu játtanunum.

Fíggjarætlanin 2006 hjá Tórshavnar kommunu javnvigar við 517 mió. kr., og hjá Tórshavnar havn er javnvágin 52 mió kr. Tilsamans er talan um 569 mió. kr., sum vit hava bundið okkum til at umseta til tænastur og íløgur. Fíggjarætlanin 2006, sum er tann fyrsta hjá hesum býráðnum, varð einmælt samtykt.

Kommunan er vaksin til á leið 173 $km^2$. Tórshavnar kommuna røkkur nú frá Borðini og Kirkjubønesi til á Deild Norðuri í Sundum og til Koltursnakka, og harvið eru samanleggingarnar komnar á mál. Kósin fyri landsins størstu kommunu skal nú setast við atliti at okkara borgarum og vinnulívi.

Í okkara virkistíð er ætlanin at fremja íløgur fyri tilsamans umleið 450 mió. kr. Hesum røkka vit við miðvísum arbeiði og góðari stýring. Vit skulu burtur úr tí støðu, har íløguætlanin fyri eitt heil ár stendur óbrúkt við endan á fíggjarárinum.

Av nýggjum íløgum ella umbyggingum og dagføringum, sum vit skulu fremja í hesi setanini, fara størstu peningaupphæddirnar til kommunuskúlarnar. Peningur er eisini markaður til ellis- og umlættingarheim, umhvørvið og brennistøð, vegir, kloakkir, vatnveiting og reinsiverk, ítrótt o.a.

2006 er fysta árið, kommunurnar yvirtaka rakstraruppgávur frá landinum á ein skipaðan hátt, har ábyrgd og avgerðarrættur fylgjast. Hetta kunnu vit frøast um. Talan er um barnaverndarøkið og stuðulsskipanina, sum kosta á leið 24 mió. kr. ella umleið eitt skattaprosent, ið kommunuskatturin hækkaði við, og sum landsskatturin lækkar við.

Bíðilistin til grundstykkir veksur støðugt, hóast á leið 130 nýggir sethúsaeigarar fingu síni grundstykkir í summar, og sjálvt um 40 randarhússtykkir við stoyptum sokklum í næstum verða seld tí byggimeistara, ið hevur lægsta søluprís at selja húsini víðari. Fyri at bøta um støðuna, fara vit skjótast gjørligt at útstykkja enn meira í Hoyvíkshaganum, á Argjum, í Kollafirði og aðrastaðni í kommununi.

Vinnulívsfólk hava eisini góðan hug at byggja, og hetta fegnast vit sjálvandi um. Vit gera okkara til at útvega vinnustykkir í øllum pørtum av kommununi.

Tórshavnar havn, sum hevur egna fíggjarætlan, fer í næstum undir at byggja 160 metrar av atløgubryggju á Langasandi fyri at geva uppsjóvar- og laksavirkjunum og frystihúsinum har góðar arbeiðsumstøður. Tórshavnar havn arbeiðir eisini fyri at útvega bæði útróðrarbátum og stuttleikabátum fleiri bátapláss.

Omanfyrinevndu mál eru í høvuðsheitum tað, sum býráðið hevur sett sær fyri í 2006 og restina av virkistíðini.

Heðin Mortensen
borgarstjóri

**SAMLAÐ YVIRLIT YVIR ÚTREIÐSLUR OG INNTØKUR** ..... **4**

**FYRISITINGIN** ..... **8**

MIÐFYRISITINGIN ..... 9
Roknskapardeildin ..... 9
Snarskivan ..... 10
Starvsfólkadeildin ..... 11
KT-deildin ..... 12
Skattakærudeildin ..... 13
TRIVNAÐARFYRISITINGIN ..... 14
Mentamáladeildin ..... 14
Barna- og ungdómsdeildin ..... 15
Sosiala deild ..... 16
TEKNISKA FYRISITINGIN ..... 17
Tekniska deild ..... 17
Byggi- og býarskipanardeildin ..... 18
Býarskipan ..... 18
Byggimálsviðgerð ..... 18
Lendisdeildin ..... 18
Húsaumsitingin ..... 18

**TEKNISKAR VEITINGAR** ..... **20**

Vegir, gøtur, kloakkir o.a. ..... 20
Vatnveitingar og gøtuljós ..... 21
Kommunala brennistøðin ..... 22
Asfalt, ferðsla og reinhald ..... 24
Bussleiðin ..... 25
Sløkkiliðið ..... 26
Útskiftan av amboðum ..... 27

**VEITINGAR - BYGGIDEILDIN** ..... **28**

Býarskipan ..... 28
Byggimálsviðgerð ..... 29
Lendisdeildin ..... 29
Húsaumsitingin ..... 30

**SKÚLAMÁL** ..... **32**

Fólkaskúlin ..... 32
Kvøldskúlin ..... 33
Musikkskúlin ..... 34

**MENTAN OG FRÍTÍÐ** ..... **36**

Tórshavnar býarsavn ..... 36
Býarbókasavnið ..... 37
Svimjihøllin ..... 38
Stadion ..... 39
Dagstovnar og dagrøkt ..... 40
Margarinfabrikkin – ..... 41
virkishús fyri børn og ung ..... 41

**SOSIAL- OG HEILSUMÁL** ..... **42**

Lækna- og heilsumál ..... 43
Tannlæknastovan ..... 43
Eldraøkið ..... 44
Heimavitjunartænastan ..... 45
Ellis- og umlættingarheimið ..... 45
Sambýlið í Hoydølum ..... 46
Tjarnargarður ..... 46
Vallalíð ..... 47
Tilhaldið í Tórsgøtu ..... 48

**JÁTTANARREGLUR Í SAMBANDI VIÐ FÍGGJARÆTLANINA 2006** ..... **50**

# Samlað yvirlit yvir útreiðslur og inntøkur

## Útreiðslur

| Deild | Heiti: | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| 01 | Miðfyrisitingin | 18.680 | 16.630 | 14.175 | 14.359 |
| 02 | Trivnaðarfyrisitingin | 6.950 | 6.006 | 5.642 | 5.832 |
| 03 | Tekniska fyrisitingin | 13.090 | 12.841 | 11.177 | 11.873 |
| 04 | KT-deildin | 4.900 | 4.250 | 3.666 | 3.644 |
| 05 | Skattakærunevndin | 1.900 | 1.935 | 1.633 | 1.618 |
| | **Fyrisiting íalt** | **45.520** | **41.662** | **36.293** | **37.326** |
| | | | | | |
| 11 | Vegir, gøtur og kloakkir v.m. | 14.800 | 14.800 | 11.200 | 14.058 |
| 12 | Umhvørvismál | 1.200 | | | |
| 14 | Vatnveiting og gøtuljós | 12.000 | 11.900 | 10.665 | 10.130 |
| 15 | Renovatión | 17.000 | 14.876 | 13.157 | 12.329 |
| 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | 17.800 | 14.662 | 13.625 | 16.504 |
| 18 | Bussleiðin | 8.900 | 8.761 | 8.838 | 8.887 |
| 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | 9.430 | 8.132 | 7.561 | 6.272 |
| 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | 9.000 | 7.342 | 7.072 | 8.164 |
| | **Tekniskar veitingar íalt** | **90.130** | **80.743** | **72.117** | **76.344** |
| | | | | | |
| 20 | Skúlin í Hesti | 100 | 265 | 0 | |
| 21 | Nólsoyar skúli | 449 | 449 | 0 | |
| 22 | Velbastaðar skúli | 600 | 800 | 0 | |
| 23 | Kaldbaks skúli | 380 | 392 | 366 | 307 |
| 24 | Kollafjarðar skúli | 1.436 | 1.615 | 1.670 | 1.793 |
| 25 | Tórshavnar kommunuskúli | 4.076 | 4.321 | 4.037 | 5.412 |
| 26 | Venjingarskúlin | 3.315 | 3.610 | 3.509 | 4.317 |
| 27 | Eysturskúlin | 4.189 | 4.755 | 4.521 | 7.813 |
| 28 | Sankta Frans skúli | 2.840 | 3.169 | 3.132 | 4.447 |
| 29 | Hoyvíkar skúli | 3.133 | 3.212 | 3.178 | 3.726 |
| 30 | Argja skúli | 3.163 | 3.334 | 3.301 | 4.442 |
| 31 | Kvøld -, ungdóms- og listaskúlin | 4.407 | 4.105 | 4.545 | 4.517 |
| 32 | Tórshavnar musikkskúli | 5.774 | 5.072 | 4.331 | 4.452 |
| 33 | Felags skúlamál | 3.790 | 3.385 | 3.868 | 3.814 |
| | **Skúlamál íalt** | **37.252** | **38.484** | **36.458** | **45.040** |

| Deild | Heiti: | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| 34 | Tórshavnar býarsavn | 390 | 150 | 550 | 652 |
| 35 | Býarbókasavnið | 6.120 | 4.826 | 4.034 | 4.253 |
| 36 | Svimjihøllin | 5.291 | 4.884 | 4.004 | 5.473 |
| 37 | Stadion | 3.580 | 3.830 | 830 | 1.068 |
| 39 | Ymsir studningar | 6.180 | 5.305 | 4.655 | 4.870 |
| 64 | Stuðul til feløg o.o | 3.750 | 4.000 | 4.000 | 3.558 |
| | **Mentan og frítíð** | **25.311** | **22.995** | **18.073** | **19.873** |
| | | | | | |
| 40 | Sosial umsorgan og forsorg v.m. | 32.865 | 7.615 | 6.662 | 9.886 |
| 41 | Lækna- og heilsumál | 3.785 | 3.360 | 3.067 | 3.524 |
| 411 | Serflutningsskipanin | 325 | 325 | 325 | 316 |
| 42 | Tannlæknastovan | 9.027 | 8.621 | 8.634 | 7.820 |
| 43 | Ellis- og umlættingarheimið | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 431 | Sambýlið í Hoydølum | 445 | 445 | 405 | 537 |
| 432 | Nýtt sambýli | 0 | 0 | 450 | |
| 433 | Heimið í Vallalíð | 0 | | | |
| 432 | Tjarnargarður | 0 | | | |
| 434 | Sambýlið í Kollafirði | 450 | | | |
| 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **Sosial og heilsumál íalt** | **46.897** | **20.366** | **19.543** | **22.083** |
| | | | | | |
| 45 | Kommunala dagrøktin | 7.821 | 5.401 | 8.531 | 7.949 |
| 46 | Miðstovnurin í Gundadali | 1.312 | 1.300 | 1.315 | 1.408 |
| 47 | Lítliskógur | 4.208 | 4.207 | 4.088 | 3.893 |
| 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | 2.164 | 2.183 | 2.175 | 2.282 |
| 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | 2.390 | 2.367 | 2.358 | 2.530 |
| 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | 2.390 | 2.367 | 2.358 | 2.235 |
| 51 | Býlingshúsið millum Gilja | 2.390 | 2.367 | 2.358 | 2.232 |
| 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | 2.181 | 2.119 | 2.112 | 2.208 |
| 53 | Býlingshúsið vesturi á Flat | 2.390 | 2.287 | 2.358 | 2.489 |
| 54 | Býlingshúsið inni á Gøtu | 2.471 | 2.447 | 1.715 | 2.461 |
| 55 | Útibarnagarðurin Túgvan | 888 | 600 | 638 | 743 |
| 56 | Útibarnagarðurin Spírin | 0 | 400 | 798 | 645 |
| 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | 2.955 | 3.166 | 2.963 | 3.225 |
| 562 | Dagst. millum Bóla í Kollafirði | 1.453 | 1.599 | 1.594 | 1.485 |
| 563 | Dagstovnur við Landavegin | 3.197 | 3.070 | 1.041 | 1.181 |
| 564 | Stella Maris Vøggustova | 2.713 | 2.814 | 2.802 | 2.610 |
| 565 | Dagstovnurin Sólareyga | 3.133 | 3.070 | 150 | 50 |
| 566 | Dagstovnurin í Løkjatúni | 2.251 | 2.524 | 133 | 1.637 |
| 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | 4.885 | 4.878 | 5.003 | 4.447 |
| | ***At flyta á næstu síðu*** | ***51.192*** | ***49.166*** | ***44.490*** | ***38.270*** |

| Deild | Heiti: | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Flutt frá undanfarnu síðu* | *51.192* | *49.166* | *44.490* | *38.270* |
| | | | | | |
| 568 | Barnagarðurin á Velbastað | 2.402 | 1.888 | 0 | 0 |
| 569 | Leikalund í Nólsoy | 1.087 | 1.022 | 0 | 0 |
| 57 | Frítíðarskúlin | 6.950 | 7.399 | 5.991 | 5.993 |
| 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | 2.794 | 2.767 | 2.511 | 2.865 |
| 581 | Útibarnagarðurin á Hvítanesi | 321 | 634 | 634 | 774 |
| 582 | Dagstovnurin í Ovarugøtu | 385 | 0 | 465 | 650 |
| 583 | Dagstovnurin í Kaldbak | 725 | 1.199 | 797 | 426 |
| 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | 2.302 | 2.303 | 1.360 | 761 |
| 585 | Dagstovnurin Kurl@ | 1.623 | 1.607 | 1.561 | 1.500 |
| 586 | Stuðulstiltakið í bridgehúsinum | 0 | 0 | 171 | 189 |
| 587 | Dagstovnurin við Botnánna | 1.088 | 1.252 | 1.357 | 1.383 |
| 588 | Margarinfabrikkin | 2.781 | 1.933 | 1.544 | 1.776 |
| 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | 2.963 | 3.094 | 2.963 | 2.865 |
| 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | 28.434 | 26.031 | 26.520 | 25.091 |
| | **Barnaansing íalt** | **105.047** | **100.294** | **90.364** | **89.983** |
| | | | | | |
| 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | 8.030 | 7.661 | 7.650 | 8.441 |
| 81 | Sethús kommununnar | 555 | 554 | 554 | 253 |
| 82 | Umsiting av bygningum | 37.145 | 25.699 | 16.122 | 7.891 |
| 63 | Útveganir | 3.500 | 3.500 | 3.000 | 3.375 |
| 68 | Útsk./útvegan av amboðum | 6.500 | 6.000 | 6.000 | 4.659 |
| | Summararb. hjá skúlaungdómi | 2.000 | | | |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **57.730** | **43.414** | **33.326** | **20.979** |
| | | | | | |
| 66 | Reguleringskonto | 3.000 | 5.000 | 6.000 | 6.000 |
| | **Rakstrarútreiðslur íalt** | **410.887** | **352.688** | **312.174** | **321.627** |
| | | | | | |
| 90 | Íløgur | 98.000 | 92.000 | 88.968 | 116.078 |
| | **Rakstur og íløgur íalt** | **508.887** | **444.688** | **401.142** | **437.705** |
| | | | | | |
| 61 | Rentuútreiðslur | 1.637 | 1.864 | 4.794 | 2.633 |
| 62 | Avdráttir av lánum | 2.053 | 1.834 | 8.780 | 5.158 |
| 67 | Tórshavnar Havn | 4.900 | 10.100 | 10.400 | 10.400 |
| | Framtíðar íløgur | 0 | 0 | 18.614 | |
| | **Lánsgjøld og grunnar** | **8.590** | **13.798** | **42.588** | **18.191** |
| | | | | | |
| | **Útreiðslur íalt** | **517.477** | **458.486** | **443.730** | **455.897** |

# Inntøkur

| Deild | Heiti: | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| 80 | Rentuinntøkur | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 3.053 |
| 83 | Inntøkur av traðum og økjum | 3.000 | 2.000 | 2.000 | -640 |
| 85 | Aðrar inntøkur og útreiðslur | 0 | 0 | 0 | 29.202 |
| 89 | Skattainntøka | 512.477 | 454.713 | 439.600 | 460.563 |
| | | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **517.477** | **458.713** | **443.600** | **492.178** |

# Fyrisitingin

Høvuðsendamálið við fyrisitingini er at veita býráðnum, borgarum og vinnulívi eina góða kommunala tænastu og at umsita tilfeingið hjá kommununi á fullgóðan og tryggan hátt.

Fyrisitingin hjá Tórshavnar kommunu er skipað í eina Miðfyrisiting, Trivnaðarfyrisiting og eina Tekniska fyrisiting. Harafturat er skipað ein serstøk tænastueind, sum hevur fingið heitið Stjórnarskrivstovan.

Høvuðsuppgávurnar á Stjórnarskrivstovuni eru at virka sum tænastueind fyri borgarstjóran, kommunustjóran, trivnaðarstjóran, tekniska stjóran og miðfyrisitingarstjóran. Harumframt hevur Stjórnarskrivstovan eisini aðrar uppgávur at røkja innan fyrisiting og umboðan.

Borgarstjórin hevur ovastu dagligu leiðsluna á kommunalu fyrisitingini um hendi, og hann stjórnar kommununi saman við kommunustjóranum, trivnaðarstjóranum, tekniska stjóranum og miðfyrisitingarstjóranum.

Leiðslan hevur ábyrgdina av, at kommunan verður væl rikin, og at lógir og reglugerðir verða hildnar. Somuleiðis skal leiðslan arbeiða fyri, at kommunan er eitt gott arbeiðspláss, har starvsfólk trívast og mennast.

Leiðslan skal virka fyri, at politisku stevnumiðini og avgerðir verða fylgd. Eisini skal leiðslan syrgja fyri, at borgarstjórin, nevndarformenn og býráðslimir fáa eina munadygga tænastu frá fyrisitingini, soleiðis at avgerðir verða tiknar á einum haldgóðum grundarlagi.

***Fyrisitingin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Miðfyrisitingin | **18.680**[1] | 16.630[2] | 14.175[3] | 14.359 |
| Trivnaðarfyrisitingin | **6.950** | 6.006 | 5.642 | 5.832 |
| Tekniska fyrisitingin | **13.090** | 12.841 | 11.177 | 11.873 |
| KT-deildin | **4.900** | 4.250 | 3.666 | 3.644 |
| Skattakærudeildin | **1.900** | 1.935 | 1.633 | 1.618 |
| **Fyrisiting íalt** | **45.520** | **41.662** | **36.293** | **37.326** |

***Starvsfólk í fyrisitingini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** |
|---|---|---|---|
| Miðfyrisitingin | **40,64**[4] | 32,5 | 32,5 |
| Trivnaðarfyrisitingin | **22,5** | 19,5 | 18,5 |
| Tekniska fyrisitingin | **29** | 24 | 24 |
| KT-deildin | **8** | 8 | 8 |
| Skattakærudeildin | **3** | 3 | 3 |
| **Starvsfólk íalt** | **103,14** | **87** | **86** |

[1] Lagt er ikki upp fyri lønarvøkstri. Hetta er galdandi allastaðni í 2006, uttan á barnaansingarøkinum.
[2] Lønarvøkstur er roknaður uppí.
[3] Lagt er ikki upp fyri lønarvøkstri í ætlanini fyri 2004. Hetta er galdandi allastaðni í fíggjarætlanini, barnaansingin undantikin.
[4] Tríggir næmingar eru íroknaðir starvsfólkatalið í 2006, men vóru ikki við í 2005 og 2004.

# Miðfyrisitingin

Deildirnar undir miðfyrisitingini eru: Roknskapardeildin, Starvsfólkadeildin, Snarskivan, KT-deildin og Skattakærunevndarumsitingin.

***Virkisøki***

- Ráðgeva borgarum, býráði og umsiting innan málsøki, sum Miðfyrisitingin umsitur, soleiðis at avgerðir verða tiknar á haldgóðum grundarlagi.
- Bindilið millum borgaran og kommununa.
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur - serliga við atliti at umsiting.

***Mál at røkka í 2006***

- Orða strategi fyri Miðfyrisitingina.
- Fara undir at orða starvsfólkapolitikk fyri Tórshavnar kommunu og seta hann í verk. Tað fer at taka eini tvey ár at orða starvsfólkapolitikkin og fáa hann at virka.
- Orða KT-politikk fyri Tórshavnar kommunu og seta hann í verk.
- Fara í holt við eina leiðslukunningarskipan, sum kunnar bæði politisku skipanina og umsitingina um lyklatøl í kommununi - sum eitt nú bíðilistar og íbúgvaviðurskiftir v.m.

# Roknskapardeildin

Roknskapardeildin hevur um hendi bókhaldið og syrgir fyri, at roknskaparuppgerðir eru so dagførdar sum gjørligt. Deildin skal eisini bera so í bandi, at fíggjarætlanir, roknskaparuppgerðir og leiðslukunningarskipanir eru nøktandi sum stýringsamboð í sambandi við mál-, avriks- og avtalustýring.

***Virkisøki***

- Bókhald og roknskapur fyri allar deildir og stovnar hjá kommununi.
- Samskipan av arbeiðinum við ársfíggjarætlanini, ársroknskapinum og ger av ávegis roknskaparuppgerðum.
- Menning av fíggjarstýringini sum leiðsluamboði og leiðslukunning.
- Innkrevjing fyri allar veitingar hjá kommununi.
- Ráðgeving í sambandi við fíggjarligar- og roknskaparligar spurningar.
- Eftirlit við nýtslu sambært fíggjarætlan.
- Eftirlit við, at søkt verður um neyðugar eykajáttanir.
- Umsiting av fíggjarognum kommunnunar.

***Mál at røkka í 2006***

- Farið verður undir at menna mál-, avriks- og avtalustýringina.
- Nýggj kontoskipan skal fáast at virka og skal takast í nýtslu 1. januar 2007. Skipanin verður ment í samstarvi við KSF og almennar myndugleikar.
- Allar inngangandi rokningar verða talgildar.
- Effektivisera innkrevjingina av útistandandi áogn. M.a. við nýtslu av GS og e-rokning.
- Nýggj leiðslukunningarskipan setast í verk.
- Fáa gongd á projektstýring saman við teknisku fyrisitingini.

# Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá teimum trimum fyrisitingunum, Miðfyrisitingini, Teknisku fyrisitingini og Trivnaðarfyrisitingini.

Arbeiðsøkið hjá Snarskivuni er býtt í tvey øki, sum verða nevnd kundadiskur og tænastudiskur. Kundadiskurin umsitur uppgávur, ið eru beinleiðis kunda- ella avgreiðslukendar, meðan tænastudiskurin umsitur uppgávur, sum venda inneftir ímóti málsviðgerðini.

Snarskivan hevur í høvuðsheitum um hendi avgreiðsluna, telefonmóttøkuna, journalin, fólkayvirlitið, tekniska økið, barnaansingina og kunning sum heild.

***Virkisøki***

- Fjarstøðan millum kommunu og borgara skal vera so stutt sum til ber.
- Tænasturnar, ið kommunan veitir, skulu vera sjónligar.
- Borgarin skal hava ein góðan avgreiðsludisk at venda sær til.
- Snarskivan skal veita starvsfólkum og borgarum eina professionella tænastu.

***Mál at røkka í 2006***

- Ein kommunalur portalur, sum skal geva borgaranum størri møguleikar fyri sjálvavgreiðslu, og sum skal geva munadyggari kunningin, skal leggjast út á alnótina.
- Kunningarskermar við beinleiðis sambandi við Snarskivuna skulu setast upp í økismiðdeplum - m.a. í gongugøtuni.

# Starvsfólkadeildin

Starvsfólkadeildin er ein innanhýsis tænastudeild, ið veitir fíggjarnevndini, býráðnum, stjórum og deildar- og stovnsleiðarum serkøna hjálp og vegleiðing innan starvsfólkaøkið.

Deildin hevur ábyrgdina av at menna starvsfólkapolitikkin og tryggja, at hann verður fylgdur. Deildin hevur eisini ábyrgdina av, at lønarútgjaldingar í kommununi eru í samsvari við reglurnar á økinum.

***Virkisøki***

- Lønar- og starvsfólkaavgreiðslan skal vera í samsvari við galdandi lógir, reglur, sáttmálar og starvsfólkapolitikkin, so at starvsfólk fáa so eins og virðiliga viðgerð sum til ber.
- Starvsfólkatilfeingið skal mennast soleiðis, at starvsfólk kunnu loysa sínar uppgávur á einum høgum stigi til frama fyri borgaran.

***Mál at røkka í 2006***

- Fara undir at orða starvsfólkapolitikk fyri Tórshavnar kommunu og seta hann í verk. Tað fer at taka eini tvey ár at orða starvsfólkapolitikkin og fáa hann at virka.
- Tað skal vera lættari at avgreiða leysar lønir á deildum og stovnum kommununar. M.a. skulu tímaløntir løntakarar við eini webloysn hava møguleika fyri sjálvir at lata leiðaranum arbeiðstímarnar elektroniskt. Leiðarin skal síðani elektroniskt ávísa tímarnar.
- Lønarskipanin skal mennast til at stuðla upp undir effektivari miðspjaðing av lønar- og starvsfólkaumsitingini - m.a. við at gera serstakt modul at umsita fríðtíðina hjá starvsfólkunum.

***Miðfyrisitingin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 15.450 | 13.890 | 11.435 | 11.626 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 3.980 | 3.345 | 3.345 | 3.420 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **19.430** | **17.235** | **14.780** | **15.046** |
| Inntøkur íalt | 750 | 605 | 605 | 687 |
| **Rakstaraútr. netto** | **18.680** | **16.630** | **14.175** | **14.359** |

***Starvsfólk í Miðfyrisitingini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** |
|---|---|---|---|
| Leiðslan | **3** | 3 | 3 |
| Stjórnarskrivstovan | **8** | 5 | 5 |
| Roknskapardeildin | **9** | 8 | 8 |
| Snarskivan | **12,64** | 11,5 | 11,5 |
| Starvsfólkadeildin | **8**[5] | 5 | 5 |
| **Starvsfólk íalt** | **40,64** | **32,5** | **32,5** |

[5] Fimm starvsfólk eru í føstum starvi á Starvsfólkadeildini. Tríggir næmingar eru í læru sum strivstovufólk, og starvast til skiftis á Roknskapardeildini, Snarskivuni og á Starvsfólkadeildini.

# KT-deildin

KT-deildin umsitur kunningartøknina hjá kommununi. KT-deildin skal tryggja, at kunningartøknin í kommunalu fyrisitingini virkar til fulnar. Deildin skipar eisini fyri KT-innkeypi og rakstri av tøknini. KT-deildin mennir nakrar skipanir og ger broytingar í øðrum skipanum. Deildin umsitur bæði innanhýsis og uttanhýsis edv-netið, allar servarar og sentralar skipanir hjá kommununi, og deildin veitir brúkarum hjálp og ráðgeving. KT-deildin hevur eisini telefonskipanina hjá kommununi um hendi.

***Virkisøki***

- Tryggja kommununi nøktandi kunningartøkni.
- Tryggja brúkarunum eina dygdargóða tænastu, og at KT í kommununi verður nýtt til fulnar.

***Mál at røkka í 2006***

- Fáa KT-politikkin samtyktan og settan í verk.
- Økja um førleikan hjá starvsfólkunum í kommununi við m.ø. undirvísingartilboðum. Hetta ber eisini við sær, at starvsfólk á KT-deildini fáa møguleikar fyri at fáa certificering innan sítt øki.
- Veita smærru skúlunum servara-innivist.
- Víðka telefonskipanina til eisini at fevna um ansingarstovnar, soleiðis at hesir eisini fáa fyrimunirnar av bíligari telefon.

***KT-deildin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 2.990 | 2.690 | 2.486 | 2.435 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.910 | 1.560 | 1.180 | 1.209 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **4.900** | **4.250** | **3.666** | **3.644** |
| Inntøkur íalt | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Rakstaraútr. netto** | **4.900** | **4.250** | **3.666** | **3.644** |

***Starvsfólk á KT-deildini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| KT-deildin | **8** | 8 | 8 | 7 |

***Lyklatøl:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Tal av teldum | | 380 | 220 | |
| Tal av prentarum | | 213 | 85 | |
| Tal av nettólum | | 244 | 140 | |
| Tal av eginmentum forritum | | 23 | 15 | |
| Standard forrit | | 48 | 46 | |
| System forrit | | 31 | 29 | |
| Skrásettar uppgávur | | 2.586 | 1.409 | 1.135 |

# Skattakærudeildin

Skattakærudeildin skal sambært lóg taka sær av fyrisitingarligu uppgávuni hjá Kommunalu skattakærunevndini fyri Tórshavnar øki, sum er fyrsti kærumyndugleiki yvir avgerðum hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Skattakærudeildin viðger kærur um álíkning av skatti o.a. frá borgarum og vinnurekandi í umráðnum.

***Virkisøki***

- Lýsa kærumálini, so hesi kunnu leggjast fyri Kommunalu skattakærunevndina til støðutakan.
- Avgerðirnar skulu altíð vera væl grundaðar og løgfrøðiliga haldgóðar.
- Rættartrygdin skal vera í hásæti.
- Arbeitt verður miðvíst fyri at stytta viðgerðartíðina mest møguligt og fyri at halda góðan fyrisitingarsið.

***Mál at røkka í 2006***

- Kærumálini skulu í seinasta lagi verða liðugt avgreidd innan 6 mánaðir frá tí, at kært verður.

***Skattakærudeildin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 1.425 | 1.460 | 1.343 | 1.320 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 475 | 475 | 335 | 342 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **1.900** | **1.935** | **1.678** | **1.662** |
| Endurgjald frá kommunum | 0 | 0 | 45 | 45 |
| **Rakstaraútr. netto** | **1.900** | **1.935** | **1.633** | **1.618** |

***Starvsfólk á Skattakærudeildini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Skattakærudeildin | **3** | 3 | 3 | 3 |

# Trivnaðarfyrisitingin

Deildirnar undir Trivnaðarfyrisitingini eru Sosiala deild, Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin. Trivnaðarfyrisitingin skal veita býráðspolitikarum ráð og vegleiðing, og hon skal veita borgarunum eina góða tænastu. Eisini skal hon tryggja starvsfólkunum eitt gott og mennandi arbeiðspláss.

***Virkisøki***

- Ábyrgdina av, at býráðs- og nevndarsamtyktir undir trivnaðarøkinum verða settar í verk og avgreiddar á ein nøktandi fyrisitingarligan hátt.
- Tryggja, at lógir og reglugerðir annars verðar hildnar.
- Fyrireika mál, sum verða løgd fyri Sosialu nevnd og Mentamálanevndina.

***Mál at røkka í 2006***

- Orða strategi fyri trivnaðarfyrisitingina – visiónir og ætlanir.
- Skipa nýggja Barna- og ungdómsdeild.
- Orða og seta í verk eina ítøkiliga menningarætlan fyri leiðarar innan trivnaðarøkið.

# Mentamáladeildin

Mentamáladeildin umsitur mentamál kommununar. Á fíggjarætlanini 2006 umsitur deildin 38.986.000 kr. til skúlamál og 25.446.000 kr. til mentan og frítíð. Tilsamans 64.348.000 kr.

Ábyrgdarøkið hjá Mentamáladeildini eru musikkskúlin, kvøld-, ungdóms- og listaskúlin, býarbókasavnið, sum hevur 85.ooo vitjandi árliga, svimjihøllin, sum hevur eitt árligt vitjanartal uppá 150.000, og undirvísingaramboð o..a hjá fólkaskúlunum, sum eru 11 í tali. Onnur málsøki eru stuðul til ítróttafeløg, onnur feløg og einstaklingar. Umsiting av stadionøkinum og mentanarhúsum sum Heinesens húsi, Smiðjuni í Lítluvík og Müllers Pakkhúsi er ein annar partur av virkseminum hjá deildini.

Mentamáladeildin skipar fyri móttøkum í sambandi við ymisk tiltøk hjá kommununi, m.a. tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar - Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs. Deildin umsitur Minnisgrunn Sonnu av Skarði og Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein. Deildin skipar eisini fyri listaframsýningum í Snarskivuni.

***Virkisøki***

- Leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum koma fyri í Mentamálanevndini.
- Umboðar Tórshavnar kommunu í Leiklistaráðnum. Tórshavnar kommuna er einasta kommuna, ið hevur umboð í Leiklistaráðnum.
- Umboð í bygginevndum og arbeiðsbólkum.

***Mál at røkka í 2006***

- Heildarætlan verður gjørd fyri útbygging av kommunalu skúlunum.
- Ætlan fyri 10. flokk verður gjørd.

- Triðja og fjórða bind av Havnar søgu, sum umrøður tíðarskeiðið frá 1816 til 1940, kemur út.
- Menna umstøðurnar fyri ítróttar- og frítíðarvirksemi.
- Betra umstøðurnar fyri tónleikavirksemi.
- Framhald av projektering av nýggja skúlanum í Hoyvíkshaganum, Argja Skúla og Sankta Frans skúla.
- Ítróttarbygningur til fimleik verður bygdur við Tórsvøll.
- Mentanarálitið frá 2000 verður dagført.

# Barna- og ungdómsdeildin

Barna og ungdómsdeildin er ein nýskipað deild undir Trivnaðarfyrisitingini. Barna- og ungdómsdeildin umsitur og hevur ábyrgd av 104 milliónum kr. av býráðsins fíggjarætlan 2006. Harumframt eru játtaðar 6 milliónir kr. til íløgur á barnaansingarøkinum. Í kommununi eru 33 dagstovnar, dagrøkt, tvær frítíðarstovur, 7 frítíðarskúlar og ungdómshúsið, Margarinfabrikkin.

Deildin hevur eitt nú um hendi stovnsetan av nýggjum kommunalum dagstovnum, og hon ger heildarætlan fyri, hvussu dagstovnaøkið í kommununi skal útbyggjast. Barna- og ungdómsdeildin skipar fyri skeiðum og evnisdøgum, og hon ger kunnandi tilfar til stovnarnar. Deildin fyrireikar eisini leigusáttmálar og samstarvsavtalur, og hon umsitur fríplássini, eins og hon ger hagtølini í sambandi við bíðilistan.

***Virkisøki***

- Syrgir fyri, at avgerðir býráðsins og pedagogisk stevnumið verða sett í verk.
- Ábyrgdina av, at løgtingslógin um dagstovnar og dagrøkt verður hildin, og deildin ger reglur og viðtøkur sambært hesi lóg.
- Tryggjar at tænastan er á einum nøktandi støði á øllum stovnum og økinum sum heild.
- Veitir pedagogiska ráðgeving.
- Fyrireikar mál og ger tilmæli til mentamálanevndina.
- Sæti í bygginevndum og arbeiðsbólkum.
- Ger yvirskipaðar reglur fyri fíggjarkarmin á stovnum deildarinnar.

***Mál at røkka í 2006***

- Stuðulsfólkaøkið verður endurskoðað í sambandi við lógarbroytingar, og ráðgevingarstova verður skipað undir Barna- og ungdómsdeildini.
- Ítøkiligar ætlanir leggjast fyri samstarvið millum dagstovnarnar og ráðgevingarstovuna, tá talan er um børn við serligum tørvi. Kommunan hevur sambært dagstovnalógini ábyrgdina av at gera metingar og taka avgerð um, nær eitt barn hevur serligan tørv, og hvussu hjálpin skal veitast.
- Kommunan yvirtekur stuðulsfólkaøkið 1.januar 2006 við heimild í dagstovnalógini. Tað merkir m.a. at kommunan fær skyldu til at veita øllum børnum við serligum tørvi eitt pedagogiskt tilboð.
- Námsfrøðilig menningarætlan gerast fyri barnaansingarøkið.
- Dagstovnarnir býtast sundur í økir.
- Økisleiðarar setast at taka sær av stovnunum.
- Orða ein ítøkiligan barna- og ungdómspolitikk við støði í barna- og ungdómsálitinum frá 2005.

# Sosiala deild

Sosiala deild umsitur og hevur ábyrgd av eitt nú barnaverndarlógini og stuðulsfólkaskipanini, sum eftir avgerð frá barnaverndarnevndini veitir børnum og ungum við serligum tørvi stuðul. Á eldraøkinum hevur deildin eftirlit við og ábyrgd av heimavitjunartænastuni, Ellis- og umlættingarheiminum, Tjarnargarði, heiminum við Vallalíð, eldrasambýlum og eldratilhaldinum.

***Virkisøki***

- Tryggja borgaranum eina nøktandi tænastu og dygdargóða málsviðgerð.
- Tryggja børnum, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan í góðari tíð, so tey fáa møguleikan fyri einum tryggum uppvøkstri.
- Umsitur kommunulæknaviðurskifti sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan.
- Umvegis Eldraráðið tryggja, at Tórshavnar kommuna hevur fyrilit fyri ynskjum og tørvi teirra eldru, og veita Eldraráðnum skrivarahjálp.
- Umboðan í bygginevndum og arbeiðsbólkum innan heilsu- og eldraøkið.
- Umsitur barnatannarøktina hjá kommununi, sum fevnir um øll børn frá 0 til 16 ár.

***Mál at røkka í 2006***

- Nýggj telduskipan fyri barnaverndarøkið gerast og takast í nýtslu.
- Stytta bíðilistan til ellis- og røktarheimspláss.
- Fyrireika yvirtøku av eldraøkinum frá landinum - bæði stovnar og heimarøktina.
- Fáa felags upptøkunevnd at virka, soleiðis at visitatiónin til tey ymisku tilboðini til eldri í kommununi verður betur samskipað.
- Seta tiltøk í verk fyri at tálma rúsevnismisnýtslu millum ung.
- Endurskoða stuðulsfólkaøkið í sambandi við lógarbroytingar, og at ráðgevingarstova verður skipað undir Barna- og ungdómsdeildini.

***Trivnaðarfyrisitingin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 5.990 | 5.226 | 4.872 | 5.310 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.210 | 1.030 | 1.020 | 832 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **7.200** | **6.256** | **5.892** | **6.142** |
| Inntøkur íalt | 250 | 250 | 250 | 311 |
| **Rakstaraútr. netto** | **6.950** | **6.006** | **5.642** | **5.832** |

***Starvsfólk í Trivnaðarfyrisitingini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Trivnaðarstjóri | **1** | 1 | 1 | |
| Mentamáladeildin | **3** | 3 | 3 | |
| Barna- og ungdómsdeildin | **3** | 2 | 2 | |
| Sosiala deildin | **10,5** | 8,5 | 8,5 | |
| Heimavitjunartænastan | **2** | 2 | 1 | |
| Stuðulsfólkaskipanin | **3** | 3 | 3 | |
| **Starvsfólk íalt** | **22,5** | **19,5** | **18,5** | |

# Tekniska fyrisitingin

Tekniska fyrisitingin varðar av teimum tøkniligu viðurskiftunum í kommununi.

Deildirnar í Teknisku fyrisitingini eru Byggi- og býarskipanardeildin og Tekniska deild. Býararkitekturin og býarverkfrøðingurin leiða hesar deildir, og teir hava beinleiðis tilvísing til tekniska stjóran.

Tekniska fyrisitingin virkar fyri, at fíggjarligu íløgurnar hjá kommununi verða framdar, og at kommunalu ognirnar verða riknar á skilagóðan hátt.

Tekniska fyrisitingin umsitur øll byggimál í kommununi – herundir byggiloyvi, útstykkingarloyvi og onnur líknandi nýtsluloyvi. Fyrisitingin hevur eisini um hendi kommunalar útstykkingar og útbyggingar av vegakervinum við tilhoyrandi tekniskum veitingum. Deildin skipar fyri allari kommunalari bygging og umsitur harumframt eisini brennistøðina.

# Tekniska deild

Undir Teknisku deild eru entreprenørdeildirnar, sum hvør sær hava rakstrarábyrgd. Deildirnar eru Veg- og kloakkdeildin, Reinhald- og asfaltdeildin og Vatn- og gøtuljósadeildin.

Teknisku veitingarnar, sum deildin varðar av, eru vegir og gøtur, kloakk- og vatnleiðingar og gøtuljós. Harumframt hevur deildin eftirlit við Bussleiðini og hýruvognskoyringini í kommununi. Heilsu- og umhvørvisdeildin er eisini partur av Teknisku deildini, og henda deildin tekur sær av umhvørvismálum.

***Virkisøki***

- Ábyrgdina av, at býráðs- og nevndarsamtyktir verða framdar á ein nøktandi fyrisitingarligan hátt.
- Umsita tekniska økið innan tær fíggjarligu játtanir, ið býráðið ásetir.
- Veita býráðspolitikarum og borgarum góða tænastu, ráð og vegleiðing.
- Tryggja, at arbeiðið verður framt á burðardyggum og umhvørvisvinarligum grundarlagi.

***Mál at røkka í 2006***

- Bøta um tænastustøðið við fleiri fólkum.
- Fáa til vega betri upplýsing um teknisku veitingarnar við framhaldandi menning av FDS-skipanini hjá teknisku umsitingini.
- Leggja størri orku í at menna skipanina at fáa til vega upplýsingar frá t.d. ferðsluteljingum, kloakkbrunnum og reinsiverkum umframt gøtuljósum.

# Byggi- og býarskipanardeildin

Byggi- og býarskipanardeildin er saman við Teknisku deild tekniska fyrisitingin í kommununi.

Fýra undirdeildir eru undir Byggi- og býarskipanardeildin. Undirdeildirnar eru Býarskipan, Byggimálsviðgerð, Lendisdeildin og Húsaumsitingin.
Lendisdeildin og Húsaumsitingin eru rakstrardeildir, meðan Býarskipan umsitur íløgurnar til verkætlanir fyri býráðið. Byggimálsviðgerð er ein málsviðgerðar- og eftirlitsdeild.

Byggi- og býarskipanardeildin - undir leiðslu av býararkitektinum - hevur ábyrgdina av allari býarskipan, byggimálsviðgerð, lendisumsiting og umsiting av øllum bygningunum hjá kommununi, innan tær fíggjarligu játtanir, ið býráðið samtykkir. Harafturat umsitur deildin ger av øllum byggingum og býarrúmum, sum býráðið samtykkir at gera.

## Býarskipan

Býarskipanardeildin umsitur og ger uppskot til alla býarskipan í kommununi. Harumframt vegleiðir deildin privatar útstykkjarar og sær til, at verkætlanir teirra ikki eru í andsøgn við býarskipanina.

## Byggimálsviðgerð

Byggimálsviðgerð er viðgerð av umsóknum um byggiloyvi fyri byggistig, nettonýtslustig, ognarviðurskifti o.a. Deildin vegleiðir og hevur eftirlit við bygging sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## Lendisdeildin

Lendisdeildin umsitur og skipar røktina av kommunalum lendum, ger og heldur við líka lendisgøtur og vegleiðir eigarafeløg, tá tey t.d. skipa spælipláss og uttanumøki. Harumframt skipar deildin fyri akting, upptøku av leysgangandi dýrum og týning av skaðadjórum. Lendisdeildin umsitur og hevur eftirlit við traðunum og urtagørðunum hjá kommununi.

## Húsaumsitingin

Húsaumsitingin leggur fíggjarætlan fyri at gera ábøtur, viðlíkahald og umvælingar av flest øllum bygningum hjá kommununi. Deildin umsitur alt byggiarbeiði, sum verður gjørt í kommunalum bygningum, og húsavørðarnar vísa eisini til Húsaumsitingina.

***Virkisøki***

- Ábyrgdina av, at býráðs- og nevndarsamtyktir verða framdar á ein nøktandi fyrisitingarligan hátt.
- Veitir býráðspolitikarum og borgarum góða tænastu, ráð og vegleiðing.
- Útinnir politiskar ætlanir á tekniska økinum.
- Skipar fyri støðugari menning innan virkisøkið hjá deildini.
- Syrgir fyri, at virksemið verður framt á burðardyggum og umhvørvisvinarligum grundarlagi.

*Tekniska fyrisitingin kostar:*

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 12.028 | 11.003 | 10.265 | 10.794 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.988 | 1.838 | 1.838 | 1.846 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **14.016** | **12.841** | **12.103** | **12.611** |
| Inntøkur íalt | 926 | 0 | 926 | 738 |
| **Rakstaraútr. netto** | **13.090** | **12.841** | **11.177** | **11.873** |

*Starvsfólk í teknisku fyrisitingini:*

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Tekniskur stjóri | **1** | 1 | 1 | |
| Tekniska deildin | **13** | 11 | 10 | |
| Byggideildin | **15** | 14 | 13 | |
| **Starvsfólk íalt** | **15** | **14** | **13** | |

# Tekniskar veitingar

Tekniska deild hevur ábyrgdina av, at arbeiðið innan tekniska økið hjá kommununi verður umsitið innan tær fíggjarligu játtanir, ið býráðið ásetir.

Undirdeildir undir Teknisku deild umsita teknisku veitingarnar. Tað eru Vega- og kloakkdeildin, Vatn- og gøtuljósdeildin, Brennistøðin og Asfalt- og reinhaldið.

Tekniska deild hevur harumframt eftirlit við Bussleiðini og hýruvognskoyringini í kommununi. Heilsu- og umhvørvisdeildin er eisini partur av Teknisku deild.

***Tekniska veitingar kosta:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Vegir, gøtur og kloakkir | 14.800 | 14.800 | 11.200 | 14.058 |
| Umhvørvismál | 1.200 | 0 | 0 | 0 |
| Vatnveiting og gøtuljós | 12.000 | 11.900 | 10.665 | 10.130 |
| Renovatión | 17.000 | 14.876 | 13.157 | 12.329 |
| Asfalt, ferðsla og reinhald | 17.800 | 14.662 | 13.625 | 16.504 |
| Bussleiðin | 8.900 | 8.761 | 8.838 | 8.887 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 9.430 | 8.132 | 7.531 | 6.272 |
| **Tekniskar veitingar íalt** | **81.130** | **73.131** | **65.046** | **68.180** |

# Vegir, gøtur, kloakkir o.a.

Deildin hevur um hendi nýgerð og heldur við líka høvuðskloakkir við pumpubrunnum og reinsiverk. Deildin heldur eisini við líka kommunalu vegirnar.

Eins og undanfarin ár viðgerð Tekniska deild saman við SEV, Føroya Tele og øðrum deildum hjá Tórshavnar kommunu, hvørji felags arbeiði skulu gerast í 2006. Ein arbeiðslisti er gjørdur, og kostnaðarmeting verður gjørd fyri hvørt einstakt arbeiði. Arbeiðslistin er tvíbýttur. Størri arbeiðir verða fíggjað sum íløgur, meðan smærri arbeiðir verða fíggjað umvegis raksturin.

***Virkisøki***

- Tryggjar borgarum neyðuga reinførið, so at umhvørvið ikki verður dálkað.
- Tryggjar borgarum neyðugar flutningsmøguleikar á ferðslutryggum kommunalum vegum.

***Mál at røkka í 2006***

- Framhaldandi kloakkarbeiði eftir J. Paturssonargøtu sum liður í at fáa Eystaru og Vestaru vág reinari.
- Framhaldandi kloakkarbeiði í Hoyvíkshaganum. Leggja høvuðskloakkleiðing frá reinsiverkinum í útstykkingini, Hoyvíkshagi Suður.
- Framhald av kloakkarbeiði í Hesti.
- Ábøtur á Ytra Ringvegin og Glyvursvegin.
- Gera rundkoyring á vegamótinum við Vegin Langa, Óluvugøta og Sundsvegin og við Hvítanesvegin og Eystara ringveg.

- Arbeiða meiri miðvíst fyri at skjalprógva liðug arbeiði, soleiðis at tað er møguligt at eftirmeta kostnaðarstøðið.
- Seta arbeiðsfólk burturav at taka sær av kloakk-TV og t.d. kærum frá borgarum um trupulleikar, sum standast av yvirflatuvatni.

***Vegir, gøtur og kloakkir o.a. kosta:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 2.250 | 1.200 | 1.200 | 1.510 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 12.750 | 13.700 | 10.100 | 12.975 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **15.000** | **14.900** | **11.300** | **14.485** |
| Inntøkur íalt | 200 | 100 | 100 | 427 |
| **Rakstaraútr. netto** | **14.800** | **14.800** | **11.200** | **14.058** |

# Vatnveitingar og gøtuljós

Deildin hevur um hendi nýgerð og dagligt viðlíkahald av vatnverkunum í kommununi. Talan er um bygningar, reinsiverk, goymslubrunnar, ventil- og reduktiónsstøðir, pumpustøðir, vatnkanningar, og leiðingar.

Eins og gjørt verður við vegir og kloakkir, verður gjørdur ein arbeiðslisti við kostnaðarmeting fyri tey ymsu vatnarbeiðini, ið umsitingin hevur sett sær fyri at røkka í 2006.

Eisini hevur deildin ábyrgdina av nýgerð og at halda við líka gøtuljósini í kommununi. Tað snýr seg um elmátarar, býtisskáp, ljósmastrar og leidningar.

***Virkisøki***

- Tryggja borgaranum neyðugu vatnnøgdina, og at góðskan lýkur tey krøv, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setur.
- Syrgja fyri, at vatntrýstið er nøktandi.
- Tryggja borgaranum eitt gott gøtuljósakervi.

***Mál at røkka í 2006***

- Bøta um vatngóðskuna í m.a. Nólsoy og Kirkjubø.
- Halda fram við ætlanini at fáa nýggja vatnbyrging í Kollafirði og nýtt reinsiverk í Havnardali.
- Lækkað streymútreiðslurnar, vísandi til, at kommunan er nýtir nógva orku, og at kommunan er partur av SEV.

***Vatnveitingar og gøtuljós kosta:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 4.700 | 4.650 | 4.025 | 2.402 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 7.780 | 7.650 | 7.040 | 6.465 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **12.480** | **12.300** | **11.065** | **10.804** |
| Inntøkur íalt | 480 | 400 | 400 | 675 |
| **Rakstaraútr. netto** | **12.000** | **11.900** | **10.665** | **10.130** |

***Starvsfólk:***

| | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Ætlan 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Handverkarar/formenn | **9** | 9 | 9 | |
| Arbeiðsmenn | **8** | 8 | 6 | |

***Lyklatøl:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Vatngoymslur | **1,4 mill. m³** | 1,4 mill. m³ | 1,4 mill.m³ | |
| Vatnnýtsla pr. dag | **14.000 m³** | 14.000 m³ | 13.000 m³ | |
| Tal av gøtuljósum | **5.600** | 5.400 | 5.200 | |
| Streymnýtsla | **2.150 MWh** | 2.077 MWh | 2.000 MWh | |

# Kommunala brennistøðin

Kommunala brennistøðin er sett saman av 5 eindum. Tað eru Brennistøðin, Endurnýtslan, Jarnplássið, Tyrvingarplássið og Tangatømingin.

**Brennistøðin**
Brennistøðin brennir burturkast og veitir Fjarhitafelagnum avlopsorku. Brennistøðin ger eisini umhvørviskanningar og staðfestir ábyrgd av útlisiteraðu innsavningini av húsarhaldsburturkasti, pappi og pappíri.

**Endurnýtslan**
Endurnýtslan tekur ímóti burturkasti frá privatum og vinnuni. Hendan eindin stendur harumframt fyri pakking, goymslu og flutningi av burturkasti, ið skal til serviðgerð innanlands og uttanlands.

**Jarnplássið**
Jarnplássið tekur ímóti, viðgerð, goymir og avskipar jarn- og metalburturkast. Jarnplássið umsitur harumframt av bilvrakskipanina.

**Tyrvingarplássið**
Tyrvingarplássið tekur ímóti mold, gróti, leiri og blandaðum avgrevstri. Plássið skipar eisini fyri endurnýtslu og sølu av mold. Tilfar, sum ikki er eldført, ilska og flogøska frá brennistøðini verða tyrvd á plássinum.

**Tangatømingin**
Tangatømingin umfatar tøming av rottangum, reinsiverkum, feittskiljarum, sandfangum og oljuskiljarum. Tænastan umfatar eisini oping og reinskan av kommunalum kloakkum. Tænastan tekur sær eisini av privatum kloakkum ímóti gjaldi. Tangatømingin skipar harumframt fyri innheinting og flutningi av dálkaðari olju og oljudálkaðum vatni frá virkjum og skipum.

***Virkisøki***

- Tryggja, at alt burturkast, ið verður framleitt í kommununi, verður fyribeint á ein heilsu- og umhvørvisliga tryggan hátt.

- Veita øllum í kommununi eina góða tænastu og vegleiðing, so alt burturkast kemur til høldar og fær røttu viðgerðina.

***Mál at røkka í 2006***

- Menna fyrisitingarliga partin av virkseminum - herundir skrásetingar, skjalfestingar, hagtøl, umhvørvisstýring, kunning og upplýsing.
- Skipanir fyri vinnuburturkasti skulu gerast betri, m.a. við reglugerðum og sundurgreinaðari prísskipan, sum eggjar til umhvørvisrætta atferð.
- Økja endurnýtsluna av pappi frá virkjum.
- Brenniovnurin verður albøttur.
- Nýggj roykreinsiskipan verður bygd.
- Frárenningarskipanirnar verða dagførdar.
- Umhvørvisstýringin skal setast í verk sambært nýggju umhvørvisgóðkenningini.
- Hús verður bygt á endurnýtsluplássinum til serliga vandamikið burturkast.
- Skiljingin av burturkastinum á Endurnýtsluni skal betrast við herdum eftirliti og betri upplýsing og vegleiðing til viðskiftafólk.
- Umhvørvisviðgerðin av bilvrakum verður flutt inn í ein bygning.
- Arbeiðsmannagongdirnar skulu betrast, soleiðis at bilvrak verða viðgjørd, beint sum tey eru latin inn.
- Nýggj umhvørvisgóðkenning skal fáast til jarnplássið.
- Nýtt øki til tyrving av ikki-eldførum tilfari skal takast í nýtslu.
- Ymsar dagføringar av tyrvingarplássinum skulu gerast sambært nýggju umhvørvisgóðkenningini.
- Ein elektronisk skrásetingar- og stýringsskipan skal fáast til vega, og allir tangar skulu skrásetast. Samstarvsavtala er gjørd við IRF um rottangatøming í Tórshavnar kommunu.

***Renovatiónin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 7.845 | 6.624 | 5.952 | 7.011 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 16.338 | 13.821 | 12.722 | 13.828 |
| Húsahagi íalt | 480 | 580 | 564 | 261 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **24.663** | **21.025** | **19.238** | **21.100** |
| Inntøkur íalt | 7.663 | 6.149 | 6.081 | 8.770 |
| **Rakstaraútr. netto** | **17.000** | **14.876** | **13.157** | **12.320** |

***Starvsfólk á Kommunalu Brennistøðini:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Fastlønt starvsfólk | **20** | 18[6] | 17 | |
| Tímalønt starvsfólk | **7** | 7[7] | 6 | |

[6] Tímalønt handverkarastarv á Jarnplássinum umgjørt til fast starv.
[7] Tveir arbeiðsmenn verða settir uml. 1. september 2005.

*Lyklatøl:*

| | 2005 | 2004 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|---|---|
| Burturkast til brenning (tons) (Harav úr IRF økinum) | | 14.365 | 15.732T | 15.815T |
| Ruskposar | | 419.375 | | |
| Burturkast til tyrvingar (m3) | | 3.065 | 1.454 m³ | 783 m³ |
| Ilska til tyrvingar (tons) | | 1.562 | 2.145 T | 2.200 T |
| Flogøska til tyrvingar (tons) | | 290 | 282 T | 316 T |
| Móttøka av bilum (exl. IRF) | | 702 | 729 stk. | 815 stk. |
| Lívr. frá alivinnuni (tons) | | 290 | 639 T | 712 T |
| Móttøka spillivatnsevja (m3) | | 1.210 | 1.604 m³ | 1.575 m³ |
| Spillolju, send til IRF | | 748 | 819 T | 774 T |
| Vandamikið burturkast (tons) | | 49 | 60 T | 25 T |
| Køli- og frystiútbúnaður (stk) | | 992 | 643 stk. | 805 stk. |
| Dekk (tons) | | 505 | 200 T | 78 T |
| Akkumulatorar (tons) | | 51 | 77 T | 41 T |
| Jarn (tons) | | 5.437 | 9.224 T | 6.983 T |
| Metal (tons) | | 31 | 36 T | 20 T |
| Pappír & papp til IRF (m3) | | 5.602 | | |

# Asfalt, ferðsla og reinhald

Deildin fyri asfalt, ferðslu og reinhald hevur um hendi asfaltering, striking, viðlíkahald, vetrartænastuna umframt dagliga reinhaldið av almennum vegum, p-plássum og áum.

***Virkisøki***

- Tryggja borgaranum neyðuga reinførið í kommununi.
- Miðar áhaldandi eftir at lækka kostnaðarstøðið fyri viðlíkahaldsarbeiði.
- Roynir áhaldandi at økja livitíðirnar á løgdum asfalti.
- Tryggja øllum neyðugar og tryggar flutningsmøguleikar á kommunala veganetinum.

***Mál at røkka í 2006***

- Størri dentur leggjast á at asfaltera gongubreytir.
- Halda ta arbeiðsætlan, sum verður løgd fyri Teknisku nevnd.

***Asfalt, ferðsla og reinhald kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 370 | 332 | 368 | 2.247 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 17.630 | 17.230 | 13.572 | 16.446 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **18.000** | **17.562** | **13.940** | **18.693** |
| Inntøkur íalt | 200 | 2.900 | 315 | 2.130 |
| **Rakstaraútr. netto** | **17.800** | **14.662** | **13.625** | **16.504** |

***Lyklatøl Brennistøðin:***

| | **2006** |
|---|---|
| Vegir í Tórshavnar kommunu | Uml.166 km |
| Gongubreytir | Uml. 200km |
| Útlagdar nøgdir av asfalti | 7.000m3 |
| ....herav á koyribreytir | 5.000m2 |
| ....herav á gongubreytir | 2.000m3 |
| | |
| Tal av inntøkum | 165 |
| Tal av vegbrunnum | uml. 5000 |
| Tal av ruskíløtum | uml. 190 |
| Tilfar til striking nýtt pr. ár | 22tons |

# Bussleiðin

Tekniska deild hevur dagliga eftirlitið við Bussleiðini. Arbeiðið at reka leiðirnar er latið tveimum arbeiðstakarum. P/F Mouritsens Bussar reka busskoyringina í býnum, og Sp/f Gundurs Bussar reka leiðirnar millum Havnina, Kollafjørð og Kaldbak.

### *Virkisøki*

- Hava eina vælvirkandi bussleið, sum røkkur flest møguligum borgarum.
- Áhaldandi styrkja tænastugrundarlagið.

### *Mál at røkka í 2006*

- Fyrireika eina víðkan av Bussleiðini til eisini at umfata koyring í Hoyvíkshaganum, nú vegasamband millum býlingarnar væntandi gerst veruleiki í 2007.
- Víðka Bussleiðina í útjaðaranum í kommununi.
- Økja tænastustøðið við atliti at, hvussu ofta bussarnir skulu koyra í meldurtíðini í miðbýnum.

***Bussleiðin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 48 | 48 | 45 | 66 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 12.452 | 12.313 | 12.778 | 12.364 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **12.500** | **12.361** | **12.823** | **12.430** |
| **Inntøkur íalt** | 3.600 | 3.600 | 3.985 | 3.544 |
| **Rakstaraútr. netto** | **8.900** | **8.761** | **8.838** | **8.887** |

# Sløkkiliðið

Sløkkiliðið og verkstaðið hava um hendi eldsløkking, umhvørvisóhapp, ferðsluvanlukkur og bjarging í sambandi við storm og vatnskaðar. Sløkkiliðið hevur eisini kavarar tøkar til m.a. druknivanlukkur. Aðrar uppgávur eru koyring av rørslutarnaðum, viðlíkahald av allari sløkkiútgerð og sløkkikranum í kommununi, skorsteinseftirlit, akfarsflutningur og umvæling og viðlíkahald av øllum akførum og maskinum hjá kommununi.

***Virkisøki***

- Fáa bygningar so brunatryggar, sum til ber.
- Fyribyrgja, at eldur og óhapp henda av ósketni ella óvitan.
- Hava so holla tilbúgving sum gjørligt við samdøgursmannaðum vaktarsentrali.
- Geva manningini so góðan førleika sum gjørligt við skeiðvirksemi.

***Mál at røkka í 2006***

- Seta leys sløkkiliðsfólk í teimum økjum, ið eru komin afturat Tórshavnar kommunu, soleiðis at kommunan kann veita borgarunum á staðnum nøktandi trygd. 12 fólk í Nólsoy, 6 í Hesti og Koltri, 6 á Velbastað og í Kirkjubø og 6 í Kaldbak.
- Útbúgva nýggju sløkkiliðsfólkini eftir **kunngerð nr. 150 frá 17. desember 2001 kapittul 3, Útbúgving av sløkkiliðsfólki uttan sløkkibil.**
- Útvega nýggju sløkkiliðsfólkunum persónliga útgerð - branddrakt, brandhjálm, brandhandskar, belti og stivlar, so manningin er klár at seta inn í tilbúgvingina.

***Sløkkiliðið kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 9.027 | 8.087 | 7.566 | 7.152 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 3.063 | 2.335 | 2.285 | 2.175 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **12.090** | **10.422** | **9.851** | **9.326** |
| Inntøkur íalt | 2.660 | 2.290 | 2.320 | 3.054 |
| **Rakstaraútr. Netto** | **9.430** | **8.132** | **7.531** | **6.272** |

***Starvsfólk:***

| | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 |
|---|---|---|---|
| Skrivstova | **1,5** | 1,5 | 1,5 |
| Verkstað | **6** | 6 | 6 |
| Fastir brandmenn | **14** | 13 | 13 |
| Skorsteinssópari | **1** | 1 | 1 |
| Bussførari MBF | **1** | 1 | 1 |
| Arbeiðsmaður | **1** | 1 | 1 |
| **Starvsfólk íalt** | **24,5** | **23,5** | **23,5** |
| Leysir sløkkiliðsmenn: | | | |
| Tórshavn | **16** | 16 | 16 |
| Kollafjørður | **16** | 16 | 16 |
| Nólsoy | **12** | | |
| Hestur/Koltur | **6** | | |
| Velbastaður/Kirkjubøur | **6** | | |
| Kaldbak | **6** | | |

***Lyklatøl Sløkkiliðið:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Útkall eld tilsamans | | | 45 | 43 |
| Útkall óhapp tilsamans | | | 2 | 2 |
| Upptakan og flutningur av - akførum og maskinum | | | 1.387 | 1.278 |

# Útskiftan av amboðum

Økið fevnir um útskiftan av øllum maskinum, bilum, amboðum og arbeiðstólum hjá kommununi.

***Virkisøki***

- Fáa aldurin á øllum amboðum og maskinum niður á eitt hóskiligt støði, soleiðis at øll arbeiðsamboð eru tøkniliga dagførd og í fullgóðum standi.

***Mál at røkka í 2006***

- Skifta tríggjar størri bilar út - bilurin til kloakktøming, ein tangabilur til eldsløkking og ein feiðibilur.
- Royna at skifta seks av teimum smærru bilunum út.
- Skipan til skráseting av bilum og amboðum setast í verk.

***Útskiftan av amboðum kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Útsk. av amboðum | 6.500 | 6.000 | 6.000 | 4.659 |
| **Rakstaraútr. netto** | **6.500** | **6.000** | **6.000** | **4.659** |

***Lyklatøl:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Totalvirðið / nývirðið | | 72 mill. | 62 mill. | 60 mill. |
| Útskift fyri | | 6. mill. | 6. mill. | 6 mill. |

# Veitingar - Byggideildin

Byggi- og býarskipanardeildin er saman við Teknisku deild, tekniska fyrisitingin í kommununi. Byggi- og býarskipanardeildin - undir leiðslu av býararkitektinum - telur 4 deildir. Deildirnar eru Býarskipan, Byggimálsviðgerð, Lendisdeildin og Húsaumsitingin.

*Veitingar frá byggi- & býarskipanadeildini kosta:*

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Fríðkan av býnum | **9.000** | 7.342 | 7.072 | 8.164 |
| Umsiting av bygningum | **37.145** | 25.849[8] | 16.122 | 7.891 |
| Sethús kommununnar | **555** | 554 | 554 | 253 |
| **Rakstaraútr. netto** | **46.700** | **33.745** | **23.748** | **16.308** |

## Býarskipan

Býarskipanardeildin - undir leiðslu av býararkitektinum - umsitur og skipar allar kommunalar útstykkingar. Deildin ger uppskot til stýringsamboð innan býarskipan og umsitur almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt vegleiðir deildin privatar útstykkjarar og sær til, at verkætlanirnar teirra ikki eru í andsøgn við býarskipanina.

Deildin er umsitingarligi parturin av allari trivnaðar- og býarskipanarbygging og ger byggiskráir til hesar verkætlanir. Deildin umsitur verkætlaninar í byggitíðini og kunnar áhaldandi politikkararnar um gongdina.

***Virkisøki***

- Skipa og menna kommununa á einum dygdargóðum og burðardyggum støði við samtíðarhóskandi stýringsamboðum innan býarskipan.
- Bera so í bandi, at borgarin skilir tey býarskipanarligu átøkini.

***Mál at røkka í 2006***

- Endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.
- Endurskoða Heildarætlan fyri Tórshavn við atliti at býarskipan í vesturbýnum og á Argjum. Heildarætlanin skal somuleiðis endurskoðast havandi í huga, at støða skal taksat til býarskipan í bygdunum og á smáplássunum.
- Tvær útstykkingar skulu skipast í Hoyvíkshaganum.
- Miðstaðargøtan í Hoyvíkshaganum skal bjóðast út at gera, og ásetingar fyri býarskipan á økinum skulu gerast.
- Miðbýurin skal viðgerast í samsvari við Heildarætlan fyri Tórshavn um meirbygging.
- Fáa arbeiðið at gera býaratlas saman við Føroya Fornminnissavni væl ávegis við árslok 2006.
- Betra førleikan hjá deildini at umsita byggingar hjá kommununi.

[8] Húsaútreiðslur hjá skúlunum eru tiknar við í 2005.

# Byggimálsviðgerð

Byggimálsviðgerð er viðger av umsóknum um byggiloyvi fyri byggistig, nettonýtslustig, ognarviðurskifti, hædd í mun til lendið, tal av bilstøðlum og kanning av installatiónum í samráði við Teknisku deild. Deildin hevur eisini um hendi eftirlit við bygging og viðurskiftum annars, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavn fevnir um.

Harumframt er arbeiði - saman við Býarskipan og Teknisku deild - at viðgera umsóknir um útstykking av privatari og kommunalari jørð. Deildin er virkin partur av arbeiðinum at dagføra og menna almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

***Virkisøki***

- Tryggja skjóta og neyva viðgerð av umsóknum.
- Menna mannagongdir um vegleiðing og eftirlit við atliti at almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og o.ø reglugerðum, ið hoyra til virkisøkið hjá deildini.

***Mál at røkka í 2006***

- Borgarin skal fáa møguleika at eftirkanna byggistig, nettonýtslustig v.m. á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

# Lendisdeildin

Lendisdeildin umsitur og skipar røktina av kommunalum frílendum, náttúruøkjum, áum og fjørum, viðarlundum, kirkjugørðum, grasagørðum, trøum og runnum, býarhegnum, tjaldingarplássum, beinkjum og grótgørðum. Deildin ger og heldur við líka lendisgøtur og vegleiðir eigarafeløg, tá tey skulu skipa spælipláss og uttanumøki. Lendisdeildin skipar eisini fyri akting, upptøku av leysgangandi dýrum og týning av skaðadjórum. Harumframt umsitur deildin og hevur eftirlit við traðunum hjá kommununi. Lendisdeildin hevur um hendi eftirlit, skráseting, projektering og nýgerð innan sítt egna virkisøki.

***Virkisøki***

- Skapar, mennir og røkir omanfyri nevndu øki við gróðurseting og vistfrøðiligum og virðiligum átøkum.
- Styrkir og fremur fríðkan.
- Tryggjar borgaranum møguleikar fyri uttanduralívi og upplivingum hjá borgarunum innan tillutaðar fíggjarkarmar.
- Stuðlar og ráðgevur einstaklingum og eigarafeløgum, tá tey skulu gera eitt vakurt, virki og gróðrarríkt umhvørvi til uttanduralív, frítíðar- og náttúruupplivingar. Deildin vísir í hesum sambandi á lógir og reglur.

***Mál at røkka í 2006***

- Fleiri lendisgøtur.
- Nýtt hús og pláss til Lendisdeildina.
- Skipa summarfrítíðarverkætlanina fyri fólkaskúlaungdómar.
- Regluligt viðlíkahald av graslíkisvøllum.
- Fríðka dungan í Havnardali.
- Meira viðlíkahald og planting á kommunalum fríøkjum.

- Talgilt gravyvirlit í kirkjugørðunum.
- Velta og drena í viðarlundini í Havnardali.
- Staðseta nýtt kampingpláss.
- Staðseta nýggjan kirkjugarð í Hoyvík.

***Fríðkan av býnum kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 2.803 | 2.655 | 2.685 | 3.663 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 6.200 | 4.690 | 4.390 | 4.516 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **9.003** | **7.345** | **7.075** | **8.179** |
| Inntøkur íalt | 3 | 3 | 3 | 15 |
| **Rakstaraútr. netto** | **9.000** | **7.342** | **7.072** | **8.164** |

***Starvsfólk:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Handverkarar/formenn | **9** | 7 | 6 | |
| Arbeiðsmenn | **13** | 12 | 11 | |

***Lyklatøl, Fríðkan av býnum:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Havar og anlegg | **125** | 121 | 120 | |
| Kirkjugarðar | **10** | 7 | 4 | |
| Jarðarferðir | **130** | 120 | 120 | |
| Gøtur km. | **20** | 20 | 20 | |
| Rottueitur kg. | **700** | 440 | 300 | |
| Viðarlundir | **6** | 6 | 6 | |
| Hegn km. | **28** | 28 | 28 | |
| Djóraupptøkur og vespur | **200** | 190 | 170 | |

# Húsaumsitingin

Húsaumsitingin leggur fíggjarætlan fyri ábøtur, viðlíkahald og umvælingar av flest øllum bygningum hjá kommununi.

Fíggjarætlanin 2006 er løgd fyri 116 bygningar. Hesir eru skúlar, býlingshús, dagstovnar, frítíðarskúlar, røktarheim, leiguíbúðir, svimjihallir, fimleikarhallir, læknahølir, bygningar til umsiting, móttøkur o.a. umframt aðrar bygningar til ung og eldri. Eisini eru nakrir friðaðir bygningar.

Umframt hesar bygningar eru sjálvsognarstovnar, høli til frítíðarskúlan, útibarnagarður, kampingplássið, stadionøkið, og bygningar, sum Tekniska deild og Tórshavnar havn umsita. Byggideildin er eisini við til at umsita nakrar av omanfyri nevndu bygningum.

Húsaumsitingin ger útbjóðingartilfar og bjóðar arbeiðir út til arbeiðstakarar. Oftast verða størri arbeiðir boðin út til arbeiðstakarar í innbodnari útbjóðing. Til smærri arbeiðir er vanligast at biðja um undirhondsboð. Sáttmálar verða undirskrivaðir, og Húsaumsitingin hevur eftirlit við arbeiðunum.

Húsaumsitingin hevur undir sær húsavørðarnar, sum røkja umsitingarbygningarnar, barnaansingarstovnarnar, kommunalar íbúðir og aðrar bygningar.

Húsaumsitingin nýtir telduskipanina, Caretaker, har allar upplýsingar um bygningarnar verða savnaðar á einum staði. Talan er um at skráseta verandi upplýsingar um bygningarnar, matr. nr., støddir o.a. og at knýta tekningar, myndir og annað tilfar saman við, soleiðis at allar upplýsingar eru tøkar á einum staði.

***Virkisøki***

- Skipar fyri, at bygningarnir hjá kommununi verða røktir og umvældir, soleiðis at teir eru í góðum standi og lúka krøvini frá myndugleikunum til brunatrygd og arbeiðsumhvørvi.
- Sær til, at bygningarnir eru tryggjaðir hjá tryggingarfeløgunum ímóti stormi, eldi, vatnskaða o.ø.
- Setir upp ávaringarskipanir í bygningum. Hesar ávaringarskipanir boða frá eldi og innbroti.
- Dagførir tryggingar fyri bygningar og leysafæ og umsitur avtalur við veitarar.
- Bygningarnir verða eisini dagførdir, soleiðis at rørslutarnað nú sleppa inn á flest allar bygningarnar hjá kommununi.

***Mál at røkka í 2006***

- Fara undir umvælingar á Kommunuskúlanum.
- Halda fram við umvælingunum á Eysturskúlanum.
- Halda fram við umvælingunum í Hoyvíkar Skúla.
- Umvæla Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll.

***Umsiting av bygningum kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 5.500 | 2.838 | 0 | 3.018 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 32.475 | 23.691 | 16.952 | 5.702 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **37.975** | **26.529** | **16.952** | **8.720** |
| Inntøkur íalt | 830 | 830 | 830 | 829 |
| **Rakstaraútr. netto deild 82** | **37.145** | **25.699** | **16.122** | **7.891** |
| **Rakstaraútr. netto deild 81** | **555** | **554** | **554** | **253** |

***Sundurgreinan, umsitan av bygningum:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Skúlamál | **16.480** | 12.294 | 7.329 | |
| Mentan og frítíð | **3.500** | 880 | 880 | |
| Sosial og heilsumál | **900** | 405 | 405 | |
| Barnaansing | **4.350** | 3.580 | 3.580 | |
| Trygging av ognum | | 1.052 | 1.048 | |
| Sethús kommununar | **1.000** | 850 | | 117 |
| Onnur hús | **3.375** | 3.770 | 3710 | 4.303 |
| Fastar útreiðslur | **8.370** | 3.698 | | 4.299 |

***Starvsfólk:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Byggifrøðingar/teknikarar | **4** | 3 | 2 | |
| Húsavørðar | **16** | 12 | 9 | |

***Lyklatøl:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Tal av bygningum | **116** | 112 | | |
| Tilsamans í m² | **75.000** | | 70.000 | |
| Kommunalar íbúðir | **37** | 37 | | |

# Skúlamál

Skúlamálini fevna um fólkaskúlarnar, kvøldskúlan og musikkskúlan.

***Skúlamál kosta:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Fólkaskúlin | **23.681** | 25.922 | 23.148 | 32.257 |
| Kvøld, ungdóms og listaskúlin | **4.107** | 4.105 | 4.545 | 4.517 |
| Musikkskúlin | **5.774** | 5.072 | 4.331 | 4.452 |
| Felags skúlamál | **3.790** | 3.385 | 3.868 | 3.814 |
| **Skúlamál íalt** | **37.252** | **38.484** | **36.458** | **45.040** |

# Fólkaskúlin

Í kommununi eru 11 kommunalir fólkaskúlar og ein fráskúli við frítíðarskúlatilboði til næmingar í 1. og 2. flokki. Ein skúli hevur forskúla.
Skúlaøkið fevnir um útreiðslur til rakstur og viðlíkahald, undirvísingarmiðlar, næmingaflutning, lønir til skrivarar, reingerð, frítíðarskúlar, skúlabókasøvn og sernámsfrøðiligar tænastudeplar - røkt av serstovum og savnsrøkt.

***Virkisøki***

- Dagføra og útbyggja hølisumstøðurnar o.a soleiðis, at kommunan skapar best møguligar karmar um undirvísingina í fólkaskúlanum.

***Mál at røkka í 2006***

- Útbygging av barnaskúla og nýggjur frítíðarskúli í Hoyvík takast í nýtslu í februar 2006.
- Skúlin í Kollafirði verður liðugur til skúlaársbyrjan 2006/07. Skúlanæmingarnir fara tá at ganga í Kollafirði frá 1. til 9. flokk.
- Byrja verður at grava út fyri nýggjum skúla við Løgmannabreyt. Skúlin verður 2-sporaður, 1. til 9. flokk við frítíðarskúla. 1. byggistig, sum umfatar 1. til 3. flokk og frítíðarskúla, skal vera klárt í august 2007.
- Arbeiðið at um- og útbyggja skúlan á Argjum byrjar.
- Projekteringin byrjar í 2006 at útbyggja Sankta Frans skúla við 4 skúlastovum.
- Hølistrupulleikarnir í skúlanum á Velbastað skulu loysast.

***Fólkaskúlin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 8.074 | 9.**912** | 10.652 | 10.769 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 15.707 | **16.110** | 14.312 | 22.154 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **23.781** | **26.022** | **23.814** | **32.923** |
| Inntøkur íalt | 100 | 100 | 100 | 666 |
| **Rakstaraútr. netto** | **23.681** | **25.922** | **23.148** | **32.257** |

***Eindarprísur fyri hvønn næming í fólkaskúlanum:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Grunddeild | **1.695** | 1.695 | 1.695 | 1.695 |
| Framhaldsdeild | **2.662** | 2.662 | 2.662 | 2.662 |

*Næmingatal:*

| | 2005/2006 | 2004/2005 | 2003/2004 | 2002/2003 |
|---|---|---|---|---|
| **Næmingar íalt** | **3129** | **3.166** | **3.099** | **3.053** |
| | | | | |
| Eysturskúlin | **582** | 632 | | 620 |
| Kommunuskúlin | **592** | 578 | | 572 |
| Venjingarskúlin | **481** | 492 | | 492 |
| Hoyvíkar skúli | **457** | 450 | | 440 |
| Argja skúli | **368** | 367 | | 365 |
| Sankta Frans skúli | **302** | 310 | | 309 |
| Adventistaskúlin | **111** | 107 | | 104 |
| Kollafjarðar skúli | **124** | 121 | | 120 |
| Kaldbaks skúli | **33** | 29 | | 33 |
| Velbastaðar skúli | **44** | 43 | | |
| Nólsoyar skúli | **33** | 36 | | |
| Skúlin í Hesti | **2** | 1 | | |

# Kvøldskúlin

Lógin gevur møguleika fyri at skipa eina frítíðarundirvísing, sum er í samsvari við krøvini, ið nútíðarsamfelagið setur. Undirvísingin kann skipast í øllum lærugreinum og evnum, sum íbúgvarnir ynskja eftir reglum, ið Mentamálaráðið setur.

Kommunan og skúlin hava tí skyldu til eftir tørvi at seta á stovn hesa undirvísing. Undirvísingin skal fara fram í góðum og væl hóskandi hølum.

Undirvísingin er býtt í 3 partar:
1. Almenn frítíðarundirvísing
2. Serstøk frítíðarundirvísing
3. Frítíðarvirksemi

Tann serstaka frítíðarundirvísingin fevnir um:
a) Royndarfyrireikandi undirvísing
b) Serundirvísing
c) Yrkiskenda undirvísing

Skúlin hevur royndarfyrireikandi undivísing í 9. og 10. flokk, sum endar við próvtøku.

Yrksikend undirvísing fevnir um dugnaskapsroynd í sigling, dugnaskapsroynd í motorlæru, og S.R.C. – skeið. Hesi skeið enda øll við próvtøku.

Undir serundirvísing hevur skúlin nógv tilboð fyri brekað – menningar- og rørslutarnað. Bøtandi og fyrilitarlig.

***Virkisøki***
- Vera mentanarskapandi.
- Vera mentanarverjandi.
- Vera mentanarboðandi.

***Mál at røkka í 2006***
- Bøta um hølisviðurskiftini hjá Listaskúlanum.
- Fáa góð og væl hóskandi høli til vevarnar.

***Kvøldskúlin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 5.887 | 5.905 | 6.000 | 5.242 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.370 | 1.350 | 1.485 | 1.572 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **7.257** | **7.255** | **7.485** | **6.814** |
| Inntøkur íalt | 3.150 | 3.150 | 2.940 | 2.297 |
| **Rakstaraútr. netto** | **4.107** | **4.105** | **4.545** | **4.517** |

***Starvsfólk:***

| | **2005/ 2006** | **2004/2005** | **2003/2004** | **2002/2003** |
|---|---|---|---|---|
| Lærarar og vikarar | **156** | 120 | 140 | |

***Næmingatal í kvøldskúlanum:***

| | **2005/ 2006** | **2004/2005** | **2003/2004** | **2002/2003** |
|---|---|---|---|---|
| Næmingatal | **3.323** | 2.400 | 2.700 | |
| Lærugreinatal | **77** | 44 | 54 | |
| Undirvísingarstøð í býnum | **31** | 24 | 31 | |

***Tímasatsir:***

| | **2005/ 2006** | **2004/2005** | **2003/2004** | **2002/2003** |
|---|---|---|---|---|
| Almenn frítíðarundurvísing | **215** | 215 | 209 | |
| Serundirvísing | **258** | 258 | 251 | |
| Frítíðarvirksemi | **189** | 189 | 183 | |
| Royndarfyrireikandi undirv. | **237** | 237 | 231 | |

# Musikkskúlin

Musikkskúlin skal í samstarvi við heim, fólkaskúla og aðrar musikkfelagsskapir, menna musikalsku evni og gávur næminganna. Skúlin skal leggja grundarlagið undir eitt ríkt musikklív á staðnum.

***Virkisøki***
- Menna skapandi gávur næminganna.
- Stimbra áhugan fyri tónleiki og fremja fatan fyri tónleiki við tí fyri eygað, at hvør einstakur kann taka virknan og sjálvstøðugan lut í tónleikaligum virksemi.
- Menna næmingarnar persónliga, herundir tilvitan teirra um seg sjálvar sum part av felagsskapi, og medvit teirra um týdningin av samstarvi.
- Fyrireika næmingar til hægri tónlistarútbúgvingar.
- Gagna tónlistaumhvørvinum uttan fyri Musikksskúlans gátt.

***Mál at røkka í 2006***
- Við nýhugsan nøkta ein størri part av eftirspurninginum, skúlin hevur.
- Bøta um hølisviðurskiftini, har skúlin heldur til í dag.
- Koma eitt stig nærri at byggja nýggjan musikkskúla.

- Koma nærri málinum at kunna bjóða øllum næmingum á bíðilista undirvísing. Undirvísingartilboðið skal vera umfatandi og skal í størsta mun fevna um øll ljóðførissløg, klassiskan og rútmiskan tónleik, ljóðføris- og vokalfrálæru og samanspæl. Geva frálæru í teori, hoyrilæru, tónleikasøgu, útseting, tónasmíði o.ø.
- Frálæra í samanspæli skal vera týðandi partur av øllum virksemi Musikkskúlans.
- Skúlagongdin verður skipað eftir eini heildarætlan, har næmingurin, umframt frálæru í sínum ljóðføri, eisini luttekur í teoretiskum lærugreinum, samanspæli og í tiltøkum.

***Musikkskúlin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 7.707 | 7.131 | 6.136 | 6.401 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.405 | 1.215 | 1.110 | 1.161 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **9.112** | **8.346** | **7.246** | **7.562** |
| Inntøkur íalt | 3.338 | 3.274 | 2.915 | 3.110 |
| **Rakstaraútr. netto** | **5.774** | **5.072** | **4.331** | **4.452** |

***Starvsfólk:***

| | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Ætlan 2003** |
|---|---|---|---|---|
| Leiðsla | **1** | 1 | 1 | |
| Skrivstovufólk | **1** | 1 | 1 | 1 |
| Læraratímar pr. viku | **319,5** | 293 | 255 | 312,5 |

***Næningatal og bíðilisti:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Næmingatal | **655** | 603 | 585 | 583 |
| Næmingar á bíðilista | **2.801** | 2.714 | 2.295 | 1.802 |

# Mentan og frítíð

Mentan og frítíð fevnir um Tórshavnar býarsavn, býarbókasavnið, svimjihøllina og stadion.

**Tórshavnar býarsavn kostar:**

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar býarsavn | 390 | 150 | 550 | 652 |
| Býarbókasavnið | 6.120 | 4.826 | 4.034 | 4.253 |
| Svimjihøllin | 5.291 | 4.884 | 4.004 | 5.473 |
| Stadion | 3.580 | 3.830 | 830 | 1.068 |
| Ymiskir studningar | 6.180 | 5.305 | 4.655 | 4.870 |
| Stuðul til feløg o.o. | 3.750 | 4.000 | 4.000 | 3.558 |
| **Mentan og frítí íalt** | **25.311** | **22.995** | **18.073** | **19.873** |

# Tórshavnar býarsavn

Tórshavnar býarsavn arbeiðir eftir løgtingslógini um bygdasøvn. Tað hevur verið fastur táttur á hvørjum ári hjá Býarsavninum at skipa fyri framsýning á ólavsøku. Undanfarnu tvey árini hevur evnið verið um býarmenningina í Havn. Ætlanin er eisini at hava framsýning á ólavsøku komandi. Tórshavnar býarsavn arbeiðir við verkætlanini, FÍHA, – Fiskivinna - Ídnaður - Handil - Arbeiði. Býarsavnið savnar eisini saman privat skjøl, og savnið hevur samstarv við Landsskjalasavnið og søvn í Íslandi og Grønlandi.

***Virkisøki***

- Skráseta gripir.
- Endalig ‘savnsskráseting’ av gripum í Müllers pakkhúsi eftir serligum leisti, sonevnda ‘grøna registrantinum’, áðrenn hetta tilfar fer út úr pakkhúsinum og á savns-goymslu.
- Røkja samskiftið við fólk og stovnar, ið lata frá sær gripir til Býarsavnið.
- Svara fyrispurningum og ymiskum fyrifallandi frá borgarum. Framhaldandi skipa fyri gongutúrum í gomlu Havnini.
- Samband við søvn og felagsskapir í Tórshavnar kommunu. Serliga fáa Nólsoyar Bygdarsavn og Kollafjarðar Bygdarsavn í rættlag við hjálp og vegleiðing.
- Ráðgeving og orða upprit til Tórshavnar býráð um mentanarsøgulig fyrilit at sýna í sambandi við byggisamtyktir og byggiloyvi. Hesar uppgávur eru umbidnar uppgávur, ið Býarsavnið greiðir ad hoc.

***Mál at røkka í 2006***

- Fáa savninum hóskandi karmar at virka undir.
- Leggja fram frágreiðingina ‘Greining av tørvinum hjá Tórshavnar Býarsavni’ við ítøkiligum ynskjum, samanberingum og tilmælum.
- Fyrireika fund í Havn í mai: ANSC – the Association of North Sea Cities. Føroya Fornminnissavn er limur, og hevur tryggjað sær, at Tórshavnar Býarsavn skal taka lut í netverkinum.

- Fyrireika fund í Havn í august: Nordens Maritime Museer, eisini saman við Føroya Fornminnissavni.
- Arbeiða við verkætlanini um 'býaratlas' eftir serligum leisti, SAVE – Survey of Architectural Values in the Environment, millum Tórshavnar kommunu og Føroya Fornminnissavn. Úrslitini av framsýningum um býarmenningina verða brúkt í verkætlanini.

***Tórshavnar býarsavn kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 420 | 420 | 0 | 400 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 120 | 130 | 550 | 306 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **540** | **550** | **550** | **706** |
| Inntøkur íalt | 150 | 400 | 0 | 54 |
| **Rakstaraútr. netto** | **390** | **150** | **550** | **652** |

# Býarbókasavnið

Býarbókasavnið er fólkabókasavn í Tórshavnar Kommunu. Ein partur av bókasavninum er Barnabókasavnið. Bókasavnið samstarvar við tey níggju skúlabókasøvnini og við Kollafjarðar bygda- og skúlabókasavn. Fimm stovnar læna smá søvn frá bókasavninum. Teir eru Tilhaldið, Láargarður, Hvíldarheimið, Tjarnargarður og Ellisheimið.

***Virkisøki***

- Arbeiða eftir løgtingslógini um bókasøvn.
- Støðugt at røkja og endurnýggja savnið. Men annað tilfar vindur upp á seg, t.d. kravið um økta teldutænastu, og kravið um annað tilfar, ljóðbond, ljóðfløgur og DVD. Roynt verður at ganga hesum á møti.
- Tilhaldsstað, og tí verður áhaldandi roynt at gera umstøður til tess.

***Mál at røkka í 2006***

- Fáa eina nýggja telduskipan.
- Halda fram at arbeiða saman við skúlabókasøvnunum og við Kollafjarðar bygda- og skúlabókasavni um bókakeyp, skráseting, felags telduforrit o.a. Kollafjarðar bygda- og skúlabókasavn skulu eisini hava ta nýggju telduskipanina at koyra í 2006.
- Framhaldandi verður arbeitt fyri at røkja og menna savnið av bókum, ljóðbókum, teldufløgum og DVD.
- Veita brúkaranum betri tænastur umvegis nýggju telduskipanina, Book-it. Eitt nú upplýsa um tilfarið, sum stendur øllum í boði at nýta.
- Halda fram at dagføra listar: DVD-listan, ljóðbókalistan og ymiskar listar fyri útlendsk ferðafólk. Málið er, at allir listar í framtíðini eisini skulu verða at finna í telduni.
- Dagføra telduforrit og heimasíðuna.
- Bøta um umstøðurnar at leita eftir hóskandi tilfari á alnótini.

***Býarbókasavnið kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | **4.187** | 4.132 | 3.633 | 3.816 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | **3.676** | 3.399 | 2.846 | 3.068 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **7.863** | **7.531** | **6.479** | **6.884** |
| Inntøkur íalt | **1.743** | 2.705 | 2.445 | 2.631 |
| **Rakstaraútr. netto** | **6.120** | **4.826** | **4.034** | **4.253** |

***Starvsfólkayvirlit:***

| Normering | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Leiðari | **1** | 1 | 1 | 1 |
| Skrivstovufólk | **5** | 5 | 5 | 5 |
| Bókavørðar | **5,5** | 5 | 5 | 5 |

***Lyklatøl:***

| | 2005 | 2004 | 2004 | 2002 |
|---|---|---|---|---|
| Vitjandi | | 90.394 | 79.525 | 78.867 |
| Útlán, Býarbókasavnið | | 77.683 | 67.016 | 67.858 |
| Útlán, skúlabókasøvn | | 38.036 | 34.535 | |

# Svimjihøllin

Svimjihøllin er karmur um almenna svimjing, ítróttarsvimjing hjá Havnar Svimjifelag, ið luttekur í kappingum á altjóða støði, umframt undirvísing hjá skúlanæmingum og dagstovnum. Svimjihøllin er opin fyri almenninginum 47 tímar um vikuna og virkar sum savningarstað fyri ung og gomul. Við so stórum tali av vitjandi er alneyðugt, at trygdin verður sett í hásæti, og tí eru starvsfólkini altíð dagførd innan fyrstuhjálp og lívbjarging.

### *Virkisøki*

- Bøta um heilsuna hjá borgarunum.
- Aðalmál at svimjihøllin altíð er rein og lýkur øll krøv, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setir.
- Veita góða tænastu.

### *Mál at røkka í 2006*

- Opin allan dagin, tá ið skúlanir hava frí og tí ikki brúka høllina til undirvísing.

***Svimjihøllin kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 4.977 | 4.640 | 4.260 | 4.671 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 2.494 | 2.424 | 2.424 | 2.151 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **7.471** | **7.064** | **6.684** | **6.822** |
| Inntøkur íalt | 2.180 | 2.180 | 2.680 | 2.234 |
| **Rakstaraútr. netto** | **5.291** | **4.884** | **4.004** | **5.473** |

***Starvsfólk:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Leiðari | **1** | 1 | 1 | |
| Varaleiðari | **1** | 1 | 1 | |
| Lívbjargarar | **8** | 8 | 8 | |
| Kassafólk | **2** | 2 | 2 | |
| Kafeteriafólk | **1,36** | 1,36 | 1,36 | |
| **Starvsfólk íalt** | **13,36** | **13,36** | **13,36** | |

***Lyklatøl:***

| | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 |
|---|---|---|---|---|
| Vitjandi sum gjalda | **121.305** | 128.173 | 128.398 | 124.302 |
| Skúlar, ÍSB og HS | **18.082** | 21.123 | 19.418 | 17.707 |

# Stadion

Stadion-virksemið fevnir um ítróttarøkið í Gundadali, vøllin á Argjum, smærri graslíkisvøllir ymsastaðni í kommununi og ítróttarøkið til frælsan ítrótt .

***Virkisøki***

- Útvega ítróttar- og ítrivsíðkarum so góðar umstøður fyri uttandura ítrótti sum gjørligt.

***Mál at røkka í 2006***

- Skifta graslíkið á ovara vølli í Gundadali út við 3. generatións-gras.
- Gera nakrar smærri graslíkisvøllir ymsastaðni í kommununi.
- Fara undir arbeiðið at gera økið til frælsan ítrótt við Sundsvegin.
- Byggja nýggjar fimleikahallir við norðara enda við Tórsvøll.

***Stadion kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 200 | 200 | 200 | 196 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 3.380 | 3.630[9] | 630 | 872 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **3.580** | **3.830** | **830** | **1.068** |
| Inntøkur íalt | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Rakstaraútr. netto** | **3.580** | **3.830** | **830** | **1.068** |

[9] Ein graslíkisvøllur verður útskiftur í 2005

# Dagstovnar og dagrøkt

Í Tórshavnar Kommunu eru 35 dagstovnar, og tveir teirra eru skipaðir sum serbarnagarðar. Tilsamans 1545 vøggustovu-og barnagarðsbørn eru í skipanini. Í dagrøktini eru 128 børn. Sjey frítíðarskúlar - ein frítíðarstova íroknað, ið rúma tilsamans 479 børnum í 1. og 2. flokki. Deildin fyri børn og ung umsitur eisini barna- og ungdómshúsið Margarinfabrikkina, har á leið 180 børn og ung hava sína dagligu gongd. 380 ársverk eru knýtt at stovnunum, og tað gevur á leið 450 starvsfólk.

***Virkisøki***

- Geva børnunum tryggar, fjølbroyttar, mennandi og stimbrandi umstøður.
- Nøkta barnaansingartørvin í allari kommununi.
- Virka fyri, at starvsfólkið er útbúgvið til uppgávuna, og at tey framhaldandi verða ment á økinum.

***Mál at røkka í 2006***

- Nýggir stovnar verða bygdir í Nólsoy og á Velbastað fyri at nøkta tørvin á vøggustovu- og barnagarðsplássum.
- Nýggjur stovnur projekteraður í Hoyvikshaganum suður til 72 børn.
- Bygnaðurin á dagstovnaøkinum verður broyttur til tess at hækka støðið á økinum.
- Námsfrøðilig menningarætlan verður gjørd fyri alt økið.

***Barnaansing kostar:***

| **t.kr.** | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 85.251 | 82.150 | 74.357 | 73.918 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 12.513 | 13.279 | 10.314 | 10.615 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **97.764** | **95.429** | **84.671** | **84.533** |
| Húsaútreiðslur íalt | 4.258 | 5.018 | 5.813 | 3.989 |
| Systkinaavsláttur | 2.100 | | | |
| Regulering, barnatal | 1.000 | | | |
| Inntøkur íalt | 75 | 150 | 120 | 68 |
| **Rakstraaútr. netto** | **105.047** | **100.297** | **90.364** | **89.980** |

***Barnatal:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Dagrøkt | **150** | 100 | 160 | |
| Kommunalir stovnar | **1.327** | 1.266 | 1.079 | |
| Sjálvsognarstovnar | **308** | 453 | 559 | |
| Frítíðarskúlar | **401** | 248 | 233 | |
| Margarinfabrikkin | **100** | 100 | 50 | |
| **Íalt** | **2.286** | **2.167** | **2.081** | |

***Árligar rakstrarútr. pr. barn fyri kommununa, 70% av samlaða kostnaðinum:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Barnagarður | **40.989** | 40.587 | 40.118 | 38.674 |
| Vøggustova | **65.270** | 64.630 | 63.979 | 61.519 |
| Frítíðarskúli | **23.356** | 22.694 | 22.284 | 21.434 |
| Dagrøkt | **52.488** | 54.351 | 48.777 | 44.602 |

*Mánaðarligt foreldragjald, 30% av samlaða kostnaðinum:*

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Barnagarður | **1.597** | 1.581 | 1.560 | 1.510 |
| Vøggustova | **2.543** | 2.518 | 2.490 | 2.400 |
| Frítíðarskúli | **1.001** | 973 | 955 | 920 |
| Dagrøkt 0-3 ár | **2.045** | 2.118 | 1.900 | 1.900 |
| Dagrøkt 3-6 ár | **1.500** | 1.500 | 1.450 | 1.450 |

# Margarinfabrikkin – virkishús fyri børn og ung

Margarinfabrikkin hevur 10 ár á baki, og har starvast 7 fólk. Margarinfabrikkin hevur 180 limir - uml. 100 børn og ung um dagin. Frítíðarskúli er í húsinum, og spælistova má-, tý- og hósdag frá kl. 09 til 12.00. Talan er um royk- og rúsfrítt umhvørvi.
Opið er fyri børnum kl.11.30 til kl.17.00 og fyri ungum kl. 18.00 til kl. 22.00. Sunnur kostur fæst til keyps.

Í barnaráðnum og ungdómsráðnum eru 6 limir og 2 starvsfólkum í hvørjum. Ráðini hava fund aðruhvørja viku. Dagliga virksemið er handaligir verkstaðir, ymisk spøl, teldukafé, tónleikatími, tíðindaritstjórn, seiðaberg, øðrvísi ítróttargreinar o.a. Av øðrum tiltøkum kunnu nevnast kappingar, spælikvøld, gentukvøld, kjakfundir, fyrilestrar, ráðstevnur, útferðir, rúsfrítt diskotek, innsavnan til hjálpararbeiði o.a.

***Virkisøki***

- Tryggja børnum og ungum góðar umstøður við at bjóða teimum aðrar alternativar frítíðarmøguleikar.
- Virka fyri, at frítíðartilboðini eru ætlað einum breiðum skara.
- Arbeiða við tí endamáli at víðka almennu vitanina.
- Skapa møguleikar fyri børn og ung við jaligum og mennandi upplivingum saman við vaksnum.
- Áhaldandi hava orðaskifti um tørvin hjá børnum og ungum fyri at menna seg á ein positivan hátt.
- Virka fyri, at ungdómurin sjálvur tekur ábyrgd av egnum viðurskiftum.

***Mál at røkka í 2006***

- Betra umstøðurnar hjá ungum tónleikarum og gera Margarinfabrikkina til eitt spælistað.
- Gera meira við verkstaðið á Margarinfabrikkini, soleiðis at bæði ung og børn hava møguleika at arbeiða kreativt.
- Verkætlanin, “Náttin er ung”, heldur fram við trimum stórum tiltøkum fyri ung í høllini á Hálsi í rúsfríum umhvørvi. Málið er at fáa tey ungu at fara í býin uttan at njóta rúsevnir ella rúsdrekka.

# Sosial- og heilsumál

Nýggj barnarverndarlóg kemur í gildi 1. januar 2006. Endamálið við lógini er at tryggja, at børn sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur.

Sammett við galdandi lóg er í nýggju lógini nágreiniliga ásett, hvørjar uppgávurnar eru hjá ávikavist nevnd og umsiting.

Barnaverndarnevndin skal einans taka avgerðir eftir tilmæli frá umsitingini. Tað vil siga, at umsitingin skal gera alt tað fyrireikandi arbeiðið, og í størri mun enn higartil skal umsitingin eisini á heimavitjan v.m.

Í nýggju lógini eru eisini fleiri tíðarfreistir ásettar fyri avgreiðslu av málunum. T. d. er ásett, at tá ein bráðfeingisavgerð verður tikin, skal henda innan tveir yrkadagar leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.

Í viðmerkingunum til lógina verður nevnt, at roknað verður við, at neyðugt er við umleið einum fakfólki fyri hvørji 775 børn í aldrinum 0 til 18 ár í kommununi.

Sambært fólkayvirlitinum vóru 5.600 børn í aldrinum 0 til 18 ár í Tórshavnar kommunu 1. januar 2005. Um eitt fakfólk skal vera fyri hvørji 775 børn, hevur tað við sær, at 7,2 starvsfólk skulu taka sær av barnaverndarmálum á Sosialu deild.

***Sosial og heilsumál kosta íalt:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Sosial umsorgan og forsorg | **32.865** | 7.615 | 6.662 | 9.886 |
| Lækna- og heilsumál | **3.785** | 3.360 | 3.067 | 3.524 |
| Serflutningsskipanin | **325** | 325 | 325 | 315 |
| Tannlæknastovan | **9.027** | 8.621 | 8.634 | 7.820 |
| Ellisheim o.a. | **895** | 445 | 855 | 537 |
| **Sosial og heilsumál íalt** | **46.897** | **20.366** | **19.543** | **22.082** |

***Sosial umsorgan og forsorg o.a. kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Barnavernd | 10.000 | 8.800 | 9.200 | 9.272 |
| Stuðulsfólkaskipanin | 5.100 | 8.900 | 8.100 | 9.871 |
| Frípláss | 5.250 | 3.850 | 3.450 | 3.851 |
| Hjálp vegna vantandi ansing | 1.500 | 500 | 1.000 | 3.681 |
| Barnavernd, stovnspláss í DK | 800 | 0 | 0 | 0 |
| Stuðulsfólkaskipanin | 5.600 | 0 | 0 | 0 |
| Barnaverndarstovan | 800 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | 1.962 | 1.062 | 962 | 636 |
| **Frípláss og stuðul o.a. íalt** | **31.012** | **23.112** | **22.712** | **27.312** |
| Endurgj. úr landskassanum | 800 | 17.950 | 17.550 | 18.840 |
| **Frípláss og stuðul o.a. íalt** | **30.212** | **5.162** | **5.162** | **8.471** |
| **Eldraansing íalt** | **2.653** | **2.453** | **1.500** | **1.415** |
| **Rakstaraútr. netto** | **32.865** | **7.615** | **6.662** | **9886** |

# Lækna- og heilsumál

Í Tórshavnar kommunu eru 10 kommunulæknar - av teimum 9 í Havn og ein í Kollafirði. Sambært løgtingslóg um kommunulæknaskipan er tað ábyrgd kommununar at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknarnar og bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi. Eisini skal kommunan útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar. Sambært løgtingslóg rindar kommunan stuðul til Hvíldarheimið Naina.

***Virkisøki***

- Umsitur kommunulæknaskipanina sambært løgtingslóg.

***Mál at røkka í 2006***

- Allir kommunulæknar skulu kunna arbeiða í talgildari heilsuskipan, sum Almanna- og heilsumálaráðið hevur gjørt avtalu um fyri føroyska heilsuverkið.
- Nýggj viðtaluhøli í Kollafirði liðug.
- Fara undir at projektera nýggj viðtaluhølir til fýra kommunulæknar í Hoyvíkshaganum.

***Lækna- og heilsumál kosta:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 850 | 750 | 700 | 834 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 2.935 | 2.610 | 2.442 | 2.758 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **3.785** | **3.360** | **3.142** | **3.592** |
| Inntøkur íalt | | 0 | 75 | 68 |
| **Rakstaraútr. netto** | **3.785** | **3.360** | **3.067** | **3.524** |

# Tannlæknastovan

Barnatannarøktin fevnir um øll børn og ung undir 16 ár í kommununi. Tannlæknastova er í Tórsgøtu í Havn og á skúlanum í Kollafirði. Harumframt verður farið út á skúlarnar til undirvísing í tannarøkt. Tannrættingin fer fram á Sertannlæknastovuni á Tinghúsvegnum.

***Virkisøki***

- Skyldu til at tryggja øllum børnum og ungum undir 16 ár fyribyrgjandi og viðgerandi tannrøkt sambært løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt frá 6. mars 1998.
- Tryggja hesum aldursbólki ókeypis fyribyrgjandi og viðgerandi tannarøkt. Tað verður m.a. gjørt við fyribyrgjandi tiltøkum, upplýsingarvirksemi og regluligum kanningum og viðgerð.

***Mál at røkka í 2006***

- Projektera nýggja tannlæknastovu saman við nýggja skúlanum í Hoyvíkshaganum.

***Tannlæknastovan kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 5.833 | 5.627 | 5.640 | 4.695 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 3.244 | 3.224 | 3.224 | 3.319 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **9.057** | **8.851** | **8.864** | **8.014** |
| Inntøkur íalt | 30 | 230 | 230 | 194 |
| **Rakstaraútr. netto** | **9.027** | **8.621** | **8.634** | **7.820** |

***Barnatal:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Børn í viðgerð | **5.026** | 5.026 | 5.043 | 4.999 |

***Starvsfólk:***

| | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 |
|---|---|---|---|
| Leiðari | **1** | 1 | 1 |
| Tannlæknar | **4,5** | 4,5 | 4,5 |
| Tannrøktarar | **1,6** | 1,6 | 1,6 |
| Klinikkassistentar | **10** | 10 | 10 |
| Reingerð | **1** | 1 | 1 |
| **Starvsfólk íalt** | **18,1** | **18,1** | **18,1** |

# Eldraøkið

Vistatiónin til Serflutningsskipan Landsins er flutt frá MBF til kommununa at umsita. Kommunan veitir stuðul til Døgurðaskipan hjá pensionistum, sum Lágargarður stendur fyri, stuðul til royndartiltakið, Miðstøð fyri minnisveik hjá Alzheimerfelagnum, og stuðlar felagsskapum, sum sjálvbodnir gera eitt vælgerandi arbeiði fyri tey sosialt veikastu í kommununi - m.a. Herbergi Frelsunarhersins og Kafé Blákrosstovuni. Eisini stuðlar kommunan ymisk tiltøk á eldraøkinum

***Virkisøki***

- Nøkta tørvin á eldrabústøðum.

***Mál at røkka í 2006***

- Byggja nýtt røktarheim við Hoyvíkstjørn til 24 búfólk.
- Farið verður undir projektering av nýggjum ellis- og røktarheimi Yviri við Strond.
- Farið verður undir at byggja vardar eldraíbúðir á Óðinshædd.
- Samskipa visitatiónina til øll tilboð til eldri í kommununi.

# Heimavitjunartænastan

Heimavitjunartænastan vitjar regluliga í heiminum hjá teimum gomlu frá 75 ára aldri.

*Virkisøki*
- Ráðgeving um heilsu, trivnað og sosial viðurskifti.
- Varðveita heilsuna og førleikan hjá teimum gomlu.
- Royna at bera so í bandi, at heilsustøðan hjá teimum, sum hava brek, ikki versnar.
- Veita tryggleika og trivnað.

*Vitjanir:*

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Heimavitjanir | | | 586 | 589 |

*Starvsfólk:*

| | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Ætlan 2003 |
|---|---|---|---|---|
| **Starvsfólk íalt** | **2** | 1 | 1 | 1 |

# Ellis- og umlættingarheimið

Ellisheimið er bústovnur fyri 25 eldri fólk, ið orsakað av ellisbrekum ella kroniskari sjúku eru partvís ella heilt óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima. Ellisheimið hevur um hendi dagliga røkt og umsorgan, sjúkrarøkt, mattænastu, ítrivsmøguleikar, reingerð og vaskarí, fótarøkt og frisør.

Umlættingarheimið veitir heimabúgvandi pensionistum og teirra avvarandi umlætting. Pláss er fyri 8 fólkum í senn. Arbeiðið á Ellisheiminum og Umlættingarheiminum er í ávísan mun samskipað.

***Virkisøki***
- Veita einstaka búfólkinum røkt, umsorgan og trivnað í einum so heimligum umhvørvi sum gjørligt.
- Tryggja, at veitingin verður veitt við virðing fyri samleikanum og sjálvsavgerðarrættinum hjá tí einstaka.

***Mál at røkka í 2006***
- Umleggja verandi arbeiðsgongd í sambandi við, at eini sethús í Mattalág við 10 búplássum skulu samkoyrast við virksemið á Ellis- og Umlættingarheiminum.
- Fáa samstarv í lag við Tjarnargarð, soleiðis at búfólkini á Ellisheiminum eisini kunnu fáa ágóðan av tí útbúnaði til fysioterapi, sum er á Tjarnargarði.
- Skifta køkin á Ellis – og umlættingarheiminum, so hann lýkur treytirnar, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setir til ein slíkan køk.

***Ellis- og umlættingarheimið kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 11.734 | 11.461 | 10.956 | 10.986 |
| | 1.994 | 1.720 | 1.576 | 1.786 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **13.728** | **13.181** | **12.532** | **12.772** |
| Endurgjald frá landinum | 13.728 | 13.181 | 12.532 | 12.772 |
| **Rakstaraútr. netto** | **0** | **0** | **0** | **0** |

***Starvsfólk:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Normering | **34** | 33 | 32,2 | |
| Ársverk | **41** | 35 | 36,0 | |

# Sambýlið í Hoydølum

Á Sambýlinum oman Hoydalar er pláss fyri níggju búfólkum. Kommunan fyrisitur raksturin av heiminum, meðan heimarøktin hevur dagligu umsitingina av arbeiðinum í heiminum um hendi. Búfólkið fær ta heimarøkt, tey annars høvdu fingið heima. Tó rindar kommunan fyri náttarvakt. Búfólkið varðveitir sína fólkapensión og rindar fyri kost, húsaleigu og aðrar felags útreiðslur.

***Virkisøki***

- Hjálpa pensionistum við ellisbrekum, ið hava tørv á starvsfólki og hjálp í gerandisdegnum.

***Sambýlið í Hoydølum kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 510 | 510 | 500 | 527 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 260 | 260 | 230 | 338 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **770** | **770** | **730** | **865** |
| Inntøkur íalt | 325 | 325 | 325 | 328 |
| **Rakstaraútr. netto** | **445** | **445** | **405** | **537** |

# Tjarnargarður

Tjarnargarður er bústovnur hjá 10 eldri búfólkum, ið orsakað av ellisbrekum ella kroniskari sjúku eru partvís ella heilt óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima.

Dagdeildin á Tjarnargarði er dagstovnur hjá 15 minnisveikum brúkarum, sum búgva heima, men koma á dagstovnin um dagin fyri at fáa eina innihaldsríka tilveru í dagtímunum saman við fólki við serligum innliti í minnisveikleika. Somuleiðis skulu hesi hava møguleika fyri at vera longri heima, samstundis sum tey nærmastu vera avlastað.

Arbeiðið á Tjarnargarði fevnir um dagliga røkt og umsorgan, sjúkrarøkt, mattænastu, ítrivsmøguleikar og viðlíkahaldsvenjing - fysiskt og minnisliga.

*Virkisøki*

- Veita einstaka búfólkinum ella brúkaranum røkt, umsorgan og trivnað í einum so heimligum umhvørvi sum gjørligt.
- Tryggja, at veitingin verður veitt við virðing fyri samleikanum og sjálvsavgerðarrættinum hjá tí einstaka.

***Mál at røkka í 2006***

- Í størri mun nýta góðu fysioterapiuni á Tjarnargarði . Ætlanin er at hava størri samstarv við Ellisheimið og Vallalíð.

***Tjarnargarður kostar:***

| t.kr. | **Ætlan 2006** | **Ætlan 2005** | **Ætlan 2004** | **Roknsk. 2004** |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 4.800 | 5.015 | | |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 1.173 | 958 | | |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **5.973** | **5.973** | | |
| Endurgjald frá landinum | 5.973 | 5.973 | | |
| **Rakstaraútr. netto** | **0** | **0** | | |

***Starvsfólk:***

| | **2006** | **2005** | **2004** | **2003** |
|---|---|---|---|---|
| Normering | **14** | 14 | | |
| Ársverk | **16** | 16 | | |

# Vallalíð

Heimið við Vallalíð er bústovnur hjá 16 minnisveikum búfólkum, ið orsakað av síni sjúku eru partvíst ella heilt óhjálpin og sostatt ikki kunnu búgva heima. Arbeiðið á Heiminum við Vallalíð fevnir um dagliga røkt og umsorgan, sjúkrarøkt, mattænastu, ítrivsmøguleikar, reingerð, klædnavask og annars alt virki, sum fer fram í einum vanligum húsarhaldi. Virksemið á heiminum byrjaði 1.oktober, og fyrstu búfólkini fluttu inn 2. nov. 2005.

*Virkisøki*

- Veita einstaka búfólkinum røkt, umsorgan og trivnað í einum heimligum, livandi og mennandi umhvørvið, har tey ikki keða seg, ikki kenna einsemi og ikki kenna hjálparloysi.
- Arbeiðið verður grundað á nýggjastu vitan innan røkt av fólki við demenssjúku.
- Arbeiðið verður grundað á sosialpsykologiskan hugburð, sum tekur støði í virðingin fyri fortíðini, nútíðini og framtíðini hjá tí einstaka búfólkinum.

### *Mál at røkka í 2006*

- Geva búfólkunum møguleikan at luttaka í dagliga arbeiðinum á heiminum s.s. matgerð, reingerð, klædnavaski v.m.
- Geva búfólkunum møguleika at geva t.d. børnum, djórum og plantum umsorgan.

***Heimið í Vallalíð kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 7.155 | 1.789 | | |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 255 | 255 | | |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **2.044** | **2.044** | | |
| Endurgjald frá landinum | 2.044 | 2.044 | | |
| **Rakstaraútr. netto** | **0** | **0** | | |

***Starvsfólk:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Normering | **21,5** | 21,5 | | |
| Ársverk | **23** | 5,4 | | |

# Tilhaldið í Tórsgøtu

Tilhaldið húsast í gomlu Føroya Banka-húsunum frá 1906, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

### *Virkisøki*

- Veita eina tænastu, sum skapar karmar, so pensjónistar í Tórshavnar kommunu varðveita og menna heilsuna, soleiðis at lívsgóðskan framhaldandi gongur aftur sum ein reyður tráður ígjøgnum lívið.
- Virka fyri persónligari menning, trivnaði og at fólk kunnu gera tað teimum dámar.

### *Mál at røkka í 2006*

- Fáa pensjónistarnar í Tórshavnar kommunu í so stóran mun, sum til ber - eisini og saman við starvsfólkunum - at skapa og skipa teir nýggju karmarnar, nú Tilhaldið hevur fingið alt húsið.

***Tilhaldið kostar:***

| t.kr. | Ætlan 2006 | Ætlan 2005 | Ætlan 2004 | Roknsk. 2004 |
|---|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur íalt | 600 | 675 | 648 | 656 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur íalt | 138 | 155 | 150 | 110 |
| **Rakstrarútreiðslur íalt** | **738** | **830** | **798** | **767** |
| Endurgjald frá landinum | 738 | 830 | 798 | 767 |
| **Rakstaraútr. netto** | **0** | **0** | **0** | **0** |

***Starvsfólk í Tilhaldinum:***

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Tilhaldið | **2** | 2 | 2 | 2 |


Vitjanir á Tilhaldinum
14.000
12.000
10.000
8.000
6.000
4.000
2.000
0
7.860
10.530
11.220
11.290
11.963
12.011
12.977
1998
1999
2000
2001
2002
2003
2004

# Játtanarreglur í sambandi við fíggjarætlanina 2006

Játtanarreglurnar áseta, hvørjar heimildir eru galdandi í.s.v. játtanina á fíggjarætlanini.

Játtanin kann liggja á fleiri stigum:

Býráðið
|
Fíggjarnevndin
|
Faknevndir
|
Fyrisitingin
|
Deildar/Stovnsleiðslan

Játtanarreglurnar áseta eisini:

- Hvørt talan er um brutto- ella nettojáttan. T.e. í hvønn mun meira- ella minni inntøkur skulu ávirka heimildirnar hjá stovninum.
  Tá talan er um bruttojáttan verður skilt ímillum inntøkur og útreiðslur, soleiðis at ein játtan er til útreiðslur og ein játtan til inntøkur.
  Tá tað snýr seg um nettojáttan, er ein játtan til allar útreiðslur og inntøkur undir einum.

- Hvørt heimild er at flyta minninýtslu ella meirnýtslu millum fíggjarárini, og hvussu stórur partur av játtanini flytingin kann vera. Tað krevst eykajáttan smb. § 41 í kommunustýrislógini til at flyta minni- ella meirnýtslu til næsta fíggjarár.

- Aðrar serligar reglur.

Fyri fíggjarárið 2006 verða hesar reglur galdandi:

**Fyrisiting.**
Konto 01–05.
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting.
Talan er um bruttojáttan. Tað er ikki loyvt at flyta ímillum lønir, aðrar útreiðslur og inntøkur.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Tekniskar veitingar.**
Konto 11, 12, 14, 15, 16, 19, 38.
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting og stovns/deildarleiðarunum.
Játtanin er nettojáttan.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til- 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Bussleiðin.**
Konto 18.
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting.
Játtanin er bruttojáttan.
Fíggjarætlanin er bindandi sambært sundurgreiningini.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Skúlamál.**
Konto 20-30 Fólkaskúlarnir
Játtanin verður umsitin av skúlastjórunum.
Játtanin er nettojáttan.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Konto 31 og 32. Kvøldskúlin og Musikkskúlin.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stovnsleiðarum.
Tað er ikki loyvt at flyta millum lønir, aðrar rakstrarútreiðslur og inntøkur.
Av øðrum rakstrarútreiðslum er loyvt at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Konto 33. Felags skúlamál.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting.
Játtanin er bindandi fyri allar undirkontir.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Mentan og umhvørvi.**
**Konto 34, 35, 36 og 37.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting ella stovnsleiðarunum.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Konto 39. Ymsir studningar.**
Játtanin verður umsitin av mentamálanevndini og avvarðandi fyrisiting.
Játtanin er bindandi sambært sundurgreiningini í fíggjarætlanini.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Konto 64. Stuðul til feløg o.o.**
Játtanin verður umsitin av fíggjarnevndini.
Játtanin er bindandi sambært játtan frá fíggjarnevndini.
Ikki nýtt játtan verður flutt til næsta fíggjarár.

**Sosial- og heilsumál.**
Konto 40 og 41. Sosial umsorgan og lækna- og heilsumál.
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting.
Játtanin er bindandi sambært sundurgreiningini í fíggjarætlanini.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Konto 411. Serflutningsskipanin.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bruttojáttan.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Konto 42. Tannlæknastovan.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er nettojáttan.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Konto 43, 431, 432, 433 og 44. Eldrarøkt.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bruttojáttan.
Loyvt er ikki at flyta meir ella minni nýtslu millum fíggjarárini.

**Barnaansing.**
Konto 45, Dagrøktin.
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bruttojáttan.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Konto 46-589, Dagstovnar.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bruttojáttan.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Konto 59, Sjálvsognarstovnar o.a.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bindandi sambært sundurgreiningini í fíggjarætlanini.
Tað er ikki loyvt at flyta millum fíggjarárini.

**Aðrar útreiðslur.**
Konto 60, Ymsar aðrar útreiðslur
Játtanin verður umsitin av avvarðandi stjóra ella deildarleiðara.
Játtanin er bindandi sambært sundurgreiningini í fíggjarætlanini.
Loyvt er ikki at flyta meir ella minni nýtslu millum fíggjarárini.

**Konto 63, Útveganir.**
Játtanin verður umsitin av fíggjarnevndini.
Játtanin er bindandi sambært játtan frá fíggjarnevndini.
Avlop verður flutt til næstu fíggjarárini.

**Kont 66, Reguleringskonto.**
Játtanin verður umsitin av fíggjarnevndini.
Játtanin er bindandi sambært játtan frá fíggjarnevndini.
Avlop verður flutt til næsta fíggjarárini.

**Konto 81 og 82, Ognir kommununnar.**
Játtanin verður umsitin av avvarðandi fyrisiting.
Játtanin er nettojáttan.
Loyvt er at flyta alt avlopið ella hall, upp til - 5%, av ársjáttanini millum fíggjarárini.

**Íløgur.**
Konto 90. Játtanin verður umsitin av býráðnum, faknevndum og fíggjarnevndini.
Víst verður til serligar politiskt/fyrisitingarligar mannagongdir í sambandi við verkætlanir.
Ikki nýtt játtan, har verkætlanin ikki er liðug, verður flutt til næsta fíggjarár.

**Í talvuni niðanfyri verður víst til fyrisitingarnar, sum eru Trivnaðarfyrisitingin, Tekniska fyrisitingin og Miðfyrisitingin.**

| | | Játtanarastøði | Brutto/nettojátt an | Framflyting | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|---|
| **01-05** | Fyrisitingin | Avvarðandi stjórar og deildarleiðarin | Bindandi fyri lønir/aðrar útreiðslur/inntøk ur | | |
| | | | | | |
| **11** | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **14** | Vatnveiting og gøtuljós | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **15** | Renovatión | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **16** | Asfalt, ferðsla og reinhald | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **18** | Bussleiðin | Fyrisitingin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| **19** | Sløkkiliðið/verkstaði ð | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **38** | Frílendisdeildin | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **68** | Ùtsk./útv. av amboðum | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| | | | | | |
| **20-30** | Fólkaskúlarnir | Skúlastjórarnir | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **31** | Kvøldskúlin | Skúlaleiðarin | Bindandi fyri lønir/aðrar útreiðslur/inntøk ur | Alt avlopið av øðrum rakstrar-útr. og hall maks –5% | |
| **32** | Musikkskúlin | Skúlaleiðarin | Bindandi fyri lønir/aðrar útreiðslur/inntøk ur | Alt avlopið av øðrum rakstrar-útr. og hall maks –5% | |
| **33** | Felags skúlamál | Fyrisitingin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| | | | | | |
| **34** | Býarsavnið | Fyrisitingin | Brutto | | |
| **35** | Býarbókasavnið | Býarbókavørðurin | Brutto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **36** | Svimjihøllin | Hallarleiðarin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **37** | Stadion | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **39** | Ymsir studningar | Mentamálanevndin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **64** | Stuðul til feløg o.o. | Fíggjarnevndin | | Alt avlopið | |
| | | | | | |
| **40** | Sosial mál | Sosiala nevnd | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| **41** | Lækna- og heilsumál | Fyrisitingin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| **411** | Serflutningsskipanin | Fyrisitingin | Netto | | |
| **42** | Tannlæknastovan | Tannlæknastjórin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **43** | Ellisheimið | Stovnsleiðarin | Brutto | | |
| **431** | Sambýlið | Fyrisitingin | Brutto | | |
| **432** | Tjarnargarður | Stovnsleiðarin | Brutto | | |
| **433** | Heimið í Vallalíð | Stovnsleiðarin | Brutto | | |
| **44** | Tilhaldið | Stovnsleiðarin | Netto | | |
| | | | | | |
| **45** | Dagrøktin | Dagrøktarleiðarin | Brutto | | |
| **46-589** | Dagstovnar | Stovnsleiðararnir | Brutto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **59** | Sjálvsognarstovnar | Fyrisitingin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| | | | | | |
| **60** | Aðrar útreiðslur | Fyrisitingin | Bindandi fyri allar undirkonti | | |
| **81** | Sethús og íbúðir | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **82** | Aðrar ognir | Fyrisitingin | Netto | Alt avlopið og hall maks –5% | |
| **63** | Útveganir | Fíggjarnevndin | Brutto | Alt avlopið | |
| **66** | Reguleringskonto | Fíggjarnevndin | Brutto | Alt avlopið | |
| **90** | Íløgur | Býráðið, fíggjarnevndin og faknevndir | Bindandi fyri allar undirkonti | | Víst verður til serligar reglur |